| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mai 2023 | Blað nr.: 457<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 25. mai 2023 **Kl**. 16:30
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 118/23 – 132/23**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen
Jón Kragesteen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Bogi Jacobsen
Eyðfríð Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mai 2023 | | Blað nr.: 458<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 118/23 | 23/02887-1 | Elsa Berg berst frá at møta á býráðsfundi 25.05.23 | 459 |
| 119/23 | 23/00153-1 | Mál beind í nevndir 2023 | 460 |
| 120/23 | 23/00958-6 | Áheitan um at avtaka Tórshavnar Ítróttarráð | 462 |
| 121/23 | 23/02576-3 | Umbøn um eykajáttan - Tannlæknastovan | 464 |
| 122/23 | 17/02942-1 | Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði | 466 |
| 123/23 | 17/03195-1 | Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil | 475 |
| 124/23 | 14/02605-15 | Ljósregulering við Eystara Ringvegur/Hvítanesvegur | 487 |
| 125/23 | 23/01258-4 | Uppskot til staðseting av einum føroyskum fongsli | 493 |
| 126/23 | 21/01777-1 | Útstykking oman fyri Argjahamar | 496 |
| 127/23 | 22/00107-1 | Árligt viðlíkahald á kommunalu brennistøðini | 506 |
| 128/23 | 23/01717-3 | Umsókn um at fáa gjørda serliga byggisamtykt fyri økið matr. nr. 1265u og 1265v, oman Viðarlund 1 og 3, Tórshavn | 512 |
| 129/23 | 22/01007-1 | Mannagongdir viðvíkjandi koyripengum til býráðs- og nevndarlimir | 514 |
| 130/23 | 23/01899-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2022 | 517 |
| 131/23 | 23/02110-1 | Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2022 | 519 |
| 132/23 | 23/00151-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023 | 521 |

**Til viðgerðar**

## 118/23 Elsa Berg berst frá at møta á býráðsfundi 25.05.23

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 118/23 | 23/02887-1 |

**Málslýsing**
Elsa Berg hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jón Kragesteen, eru loknar.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 119/23 Mál beind í nevndir 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 2/23 | 23/00153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 29/23 | 23/00153-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 59/23 | 23/00153-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 87/23 | 23/00153-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 119/23 | 23/00153-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 120/23 Áheitan um at avtaka Tórshavnar Ítróttarráð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 144/23 | 23/00958-6 |
| 2 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 120/23 | 23/00958-6 |

**Upprunin til málið**

Tórshavnar kommuna hevur fingið eina áheitan frá nevndini í Tórshavnar ítróttarráð um at góðkenna avgerð um at avtaka TÌR.

**Lýsing av málinum**

Tórshavnar Ítróttarráð varð sett á stovn í 1940.

Leikluturin hjá Tórshavnar Ítróttaráði er nógv broyttur gjøgnum árini.

Seinastu nógvu árini hevur størsti parturin av virkseminum verið rundan um Ólavsøkuna, har ráðið hevur skipað fyri skrúðgongu og tivoli.

Tað hevur seinnu árini verið ein avbjóðing at fáa fólk í nevndina.

Nevndin hevur víst á, at limafeløgini hava ríkiligt at takast við í egnum felagi, tí fólk eru sum heild upptikin og gera ikki nógv sjálvboðið arbeiðið longur.

Nevndin í TÌR hevur við telduposti á heysti 2022 boðað feløgunum frá, at øll nevndin fór at leggja frá sær á aðalfundinum í januar 2023.

Síðani hava 2 eykaðalfundir verið við tí endamálið at fáa nevndina mannaða. Tað eydnaðist ikki at fáa fólk í nevndina.

Á eykaaðalfundi tann 17.apríl 2023 hava 10 av 13 limafeløgum samtykt at avtaka Tórshavnar Ítróttaráð.

10 feløg atkvøddu fyri, at TÌR verður avtikið og 2 atkvøddu ímóti. 1 atkvøða var blonk.

Sambært viðtøkunum kann ráðið ikki avtakast uttan at hetta verður góðkent av ¾ av limunum á einum serstakliga samankallaðum eykaaðalfundi og av Tórshavnar býráð.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

Tórshavnar kommuna hevur saman við umboðum fyri TÌR gjørt uppskot til, hvussu virksemið sum TÌR hevur tikið sær av, verður gjørt á Ólavsøku í 2023.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til, at Tórshavnar býráð samtykkir avgerðina hjá 10 av 13 limafeløgum í Tórshavnar ítróttarráð um at avtaka Tórshavnar Ítróttarráð.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og staðfestir at ítróttarfeløgini hava fyrsta rætt til tiltøk á ólavsøku, og beina málið í býráðið.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddi: Annika Olsen.

## 121/23 Umbøn um eykajáttan - Tannlæknastovan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 16.05.2023 | 28/23 | 23/02576-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 156/23 | 23/02576-3 |
| 3 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 121/23 | 23/02576-3 |
| 4 Býráðsfundur | | | 23/02576-3 |

**Upprunin til málið**
Umbøn frá Tannlæknastjóranum.

**Lýsing av málinum**
Tannlæknastjórin ger vart við útreiðslur til tørvandi útgerð.

Tað snýr seg um yvirtøku av tannteknikk-høli í sertannlæknastovuni við Løgmannabreyt kr. 122.000. Tannlæknastovan keypti í hesum sambandi mesta partin av útgerð og inventari frá privatum veitara (tannrætting v.m.), sum segði hetta frá sær fyri aldur. Talan er um útgerð, sum mett verður heldur leingi aftrat, og sum er fingin til vega bíligari enn við nýútvegan. Endamál við hesum var eisini at tryggja, at sertannlæknastovan hevði hesa útgerð á staðnum fyri framhaldandi at kunna halda hesa tænastu uppi.

Harumframt eru sett stovninum strangari krøv til GDPR, sum ger, at Tannlæknastovan skal útvega nýggja telduútgerð og forrit hesum viðvíkjandi. Samlaður kostnaður fyri hetta er kr. 76.865 sambært tilboði.

Hesi bæði endamálini kostað soleiðis kr. 198.865, ið biðið verður um eykajáttan til.

Fíggjarstøðan á kontu 2310 Barnatannrøktin er merkt av meirnýtslu undanfarin ár, sum tó er innanfyri 5%, sum játtanarreglurnar seta sum mark. Við ársenda 2022 er meirnýtslan 3%, men lutfalsliga er upphæddin stór, uml. kr. 439.000.

Í sambandi við fíggjarætlanina 2023 varð gjørt vart við hækkandi kostnaðir á útgerð serliga til sertannlæknaviðgerðir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Innan grein 2 eru smáir møguleikar at fíggja hesa upphædd av rakstri. Skotið verður tí upp, at eykajáttanin í hesum føri verður fíggjað av løgukontu 2375 Tannrøkt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 2375 | L23002 | Tannlækna-miðstøð | 2310 | | Barnatann-røktin | | 200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 200.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tannlæknastjórin mæla til at játta kr. 200.000 av løgukontu 2375 Tannrøkt L23002 Tannlæknamiðstøð til kontu 2310 Barnatannrøktin sum eykajáttan. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 16. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt.

## 122/23 Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Eldranevndin | 11.09.2017 | 16/17 | 17/02942-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 196/17 | 17/02942-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 206/17 | 17/02942-1 |
| 4 Eldranevndin | 15.01.2018 | 39/18 | 17/02942-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 11/18 | 17/02942-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 15/18 | 17/02942-1 |
| 7 Eldranevndin | 21.08.2018 | 7/18 | 17/02942-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 231/18 | 17/02942-1 |
| 9 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 187/18 | 17/02942-1 |
| 10 Eldranevndin | 09.10.2018 | 14/18 | 17/02942-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 290/18 | 17/02942-1 |
| 12 Eldranevndin | 26.11.2018 | 17/18 | 17/02942-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 331/18 | 17/02942-1 |
| 14 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 269/18 | 17/02942-1 |
| 15 Eldranevndin | 15.06.2020 | 4/20 | 17/02942-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 165/20 | 17/02942-1 |
| 17 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 139/20 | 17/02942-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 195/20 | 17/02942-1 |
| 19 Eldranevndin | 08.07.2020 | 11/20 | 17/02942-1 |
| 20 Býráðsfundur | 08.07.2020 | 163/20 | 17/02942-1 |
| 21 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 165/20 | 17/02942-1 |
| 22 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 46/21 | 17/02942-1 |
| 23 Heilsu- og eldranevndin | 09.03.2021 | 9/21 | 17/02942-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 50/21 | 17/02942-1 |
| 25 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 73/21 | 17/02942-1 |
| 26 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 113/21 | 17/02942-1 |
| 27 Heilsu- og eldranevndin | 09.05.2023 | 11/23 | 17/02942-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 136/23 | 17/02942-1 |
| 29 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 122/23 | 17/02942-1 |

**Málslýsing:**
Tann parturin av Tjarnargarði, sum er gamla Marinustøðin, tørvar stórar ábøtur. Bygningurin er upprunaliga frá 1960, men varð umbygdur og tikin í nýtslu sum røktarheim í 2004, seinni kom eisini dagtilhald.

Sbrt støðulýsing, ið gjørd varð í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum, skulu brunaviðurskifti betrast munandi svarandi til uml. kr. 7 mió. Harumframt eru lekar, tak og arbeiðsumhvørvi, sum skal skiftast/betrast. Alt í alt verða hesar bygningsdagføringar mettar at kosta uml. kr. 18,5 mió.

Hetta er tí at meta sum sjálvstøðug íløguverkætlan.

Húsaumsitingin og Heilsu- og umsorganartænastan hava tí eisini umrøtt, hvørjir møguleikar eru at gagnnýta bygninginum meira í mun til tørvin hjá heilsu- og umsorganartænastuni at økja um tænastur og tilboð, serliga í mun til at fáa brúkt loftið.

Demensdepil
Í løtuni eru 10 bupláss til borgarar við demenssjúku í Kristianslon og dagtilhald er í Tjarnarlon.

Uppskotið er, at Tjarnarlon verður umbygd til 8 umlættingpláss ætlað borgarum við demenssjúku, og at loftið verður útbygt við kvistum soleiðis, at har verða høli bæði fyri dagtilhaldinum og til venjingar v.m. hjá ergoterapeutum og fysioterapeutum, sum í dag mangla slíkar umstøður. Eisini verða gjørdar aðrar broytingar, sum antin hava við bygningskrøv at gera ella við betri funktionalietet í mun til virksemið.

Eitt skitsuprojekt er gjørt, sum lýsir hesar møguleikar, eins og at kravdu bygningsdagføringarnar eru tiknar við. Harumframt fyriliggur ein kostnaðarmeting, sí hjálagt hefti.

Hugsanin við at gera ein demensdepil er, at borgarar við demenssjúku sum verða knýttir til depilin, fáa tilboð sum er nøktar teirra tørvi á einum stað. Tað vil siga at ein borgari kann fáa dagtilhald, kvøldtilhald, vikuskiftistilboð, umlætting, venjingar og búpláss á sama stað. Hetta er mett at vera ein fyrimunur fyri borgarar við demens, tí umhvørvi og starvsfólkini eru kend og skapar tað tryggleika fyri tann demesrakta.

Hesin demensdepil hevur tann fyrimun, at tilboðið til tann demenssjúka kann skipast munandi meira fleksibult alt eftir sjúkugongdini, har byrjast kann við tilboði um dagtilhald fyri síðan at seta hetta saman við tilboði um umlætting styttri og longri, fyri síðan seinni at fáa fast búpláss alt í sama bygningi.

Eisini verður mett, at hetta fakliga og rakstrarliga hevur fyrimunir. Fakliga gevur hetta fleiri fyrimunir. Tann demensrakti verður í kendum umhvørvi og starvsfólkini á deplinum kenna tann demensrakta, tað verður kontinuitetur í gongdini hjá borgaranum og harvið økist tryggleikin hjá tí demensrakta, sum hevur stóran týdning. Tey avvarðandi hava ikki sum í dag, fleiri stovnar og starvsfólk at fyrihalda seg til, tí borgarin fer at fáa øll tilboð á sama stað. Tað hevur sínar fyrimunir at vitanin verður savna á sama stað, hetta bæði tann fakliga vitanin, men eisini vitanin um borgaran. Tað er kent, at tá borgarar skifta millum stovnar detta týðandi upplýsingar um borgaran burtur. Tað verður væl lættari og skjótari at seta fyribyrgjandi tiltøk í verk, tí øll tilboðini hanga saman.

Tað er bráðfeingis tørvur á fleiri umlættingarplássum, eisini innan demens. Í mun til at byggja nýtt sjálvstøðugt, gevur henda loysnin rakstrarligar fyrimunir. Sjálvsagt krevur tað fleiri starvsfólk, tá 8 nýggj pláss verða gjørd, men í hesum føri ber til at samansjóða við verandi starvsfólkahóp á Kristianslon og dagtilhaldinum. Hetta ger, at økingin av starvsfólki verður minni enn um sjálvstøðug eind bleiv bygd. Økingin av starvsfólki svara til knapt 6 ársverk. Um hesi 8 plássini vóru bygd fyri seg, vildi tað verið neyðugt at sett áleið 8 ársverk. Umframt at hetta er ein fíggjarligur fyrimunur, er tað eisini ein fyrimunur í  og við, at tað er avbjóðandi við rekruttering.

Kostnaðarmeting fyri samlaðu verkætlanina er kr. 23,8 mió.

<u>Tilgongd víðari</u>
Henda ætlan við Tjarnargarði hongur saman við heildarætlanini um eldrabústaðir, sí mál 17/00586.

Mett verður, at byggitíð fyri hetta er uml. 12-14 mánaðir. Projektering og útboð tekur uml. 4-6 mánaðir. Í mun til hesa bygging verður mett skilabest at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku. Uppskot til tíðarætlan kann samsvarandi hesum síggja soleiðis út:

- Prosjektering byrjar 01. okt ´17
- Skipanaruppskot liðugt ultimo okt ´17
- Prosjektuppskot liðugt ultimo des ´17
- Myndugleikaprosjekt liðugt medio jan ´17
- Høvuðsprosjekt liðugt ultimo feb ´18
- Útboðstíðarskeið liðugt medio apríl ´18
- Avgerð um bygging og sáttmálar liðugt utimo apríl ´18
- Bygging byrjar 01. mai ´18
- Byggitíðarskeið 12-14 mðr
- Bygging takast endaligt í brúk juli/august ´19

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at taka undir við verkætlanini sum lýst omanfyri, harundir at geva umsitingini heimild at gera ráðgevarasáttmála um prosjektering og útboð fyri í mesta lagi kr. 1 mió at játta av tøkum løgukarmi 2775 eldraøkt.

**Eldranevndin 11. september 2017**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017**: Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Samráðing hevur verið um ráðgevarasáttmála um prosjektering. Samlaður kostnaður fyri prosjekteringsleiðslu, prosjektering, byggileiðslu og fakeftirlit er kr. 3.100.000.

Á løgukontuni L27010 Út- og umbygging av Tjarnargarði, eru tøkar kr. 1 mió. Játtast kunnu 2,1 mió av tøka løguarminum 2775 Eldrarøkt L00001.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at játta kr. 2,1 mió av løgukarmi 2775 Eldrarøkt L00001 til løgukontu L27010 Út- og umbygging av Tjarnargarði.

**Eldranevndin 15. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við Eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í samband við umbygging av Tjarnargarði eru komin fram viðurskifti sum gera at kostnaðarmetingin hækkar.

Stórt ynski hevur í nógv ár verið um at byggja báðar bygningarnar saman við einum glasmillumbygningi. Við at binda bygningarnar saman kann fáast meira skynsamur rakstur tí til ber hjá starvsfólkinum at ganga inni tí bygningurin er sum ein. Mett verður at glas millumbygningur kostar 315.500 kr. at gera.

Búfólkini á Tjarnargarði fáa mat av Lágargarði, av tí at køksviðurskiftini á Tjarnargarði ikki loyva at matur í stórum mongdum verður gjørdur á staðnum. Hetta passar illa við hugburðin um at røktarheimini í Tórshavnar kommunu skulu vera heimlig. Køkur skal gerast á Tjarnargarði í samband við umbyggingina, tó er bert hugsa at køkurin skal virka á sama hátt sum higartil. Umsitingin hevur kannað møguleikan fyri at gera køkin til stórkøk og sær hetta út til at bera til. Meirkostnaðurin fyri at gera køkin til stórkøk sum kann gera allan matin á staðnum er 350.000 kr.

Dagtilhaldi skal flytast uppá lofti. Starvsfólkini hava viðmerkt at hetta kann verða óheppi í mun til at trupult verður hjá borgarunum at fara út um sjálvir. Starvsfólkini meta at um ein altan er í samband við dagtilhaldi kunnu borgararnir sjálvir fara at fáa sær fríska luft og vildi tað avgjørt veri ein góð loysn. Byggideildin metir somuleiðis at ein altan út frá dagtilhaldinum, er ein góð loysn, eisini í mun til brandtrygd. Meirkostnaður fyri at gera altan er 250.000 kr.

Mett verður at kostnaður fyri eyka projektering av omanfyri nevnda er 100.000 kr.

Omanfyri nevnda eru stórar betranir av umbyggingini og av bygninginum.

Byggi- og býarskipanarnevndin gav ikki loyvi at gera rúmini til umlætting soleiðis sum upprunaliga ætla, tí mett var at tey vóru ov lítil og at tað ikki var wc/baðirúm til hvør kamar. Í tilmælinum hjá virkandi tekniska stjóra og virkandi leiðara á byggideildini verður tilmælt at geva byggiloyvi við teirri treyt, at verkætlanin verður endurskoða og dagførd samsvarandi dagsins normum fyri innrætting av slíkum stovnum og annars við teimum treytum sum umsitingin setur. Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 18 juni 2018 at taka undir við tilmælinum.

Hetta er tikið til eftirtektar og nýtt uppskot er gjørt sum tryggjar baðirúm/wc til hvørt kamar, umframt at hvørt kamar nú er størri enn upprunaliga ætla.
Henda broyting hevur við sær, at umframt at flyta okkurt starvsfólkarúm uppá so er tali av nýggjum búrúmum nú 7 og ikki 8 sum upprunaliga ætla.

Hinvegin so eru rúmini størri og tað vera gjørd baðirúm/wc til hvørt rúm, sum sjálvandi er ein betran í mun til at tvey búrúm deila baðirúm/wc.

Fyri at gera búrúm størri og gera baðirúm/wc til hvør kamar metir TK at meirkostnaðurin er 350.000 kr. (kostnaðarmeting kemur frá Kontrast seinni)

Meirkostnaður í sambandi við umbygging av Tjarnargarði er sostatt mettur at verða:

| | |
|---|---|
| Glas millumbygningur | 315.500,00 |
| Stór køkur | 350.000,00 |
| Altan | 250.000,00 |
| Eyka projektering, fyri omanfyri nevnda | 100.000,00 |
| Størri búrúm (serliga er tað baðirúm sum skapa meirkostna) | |

350.000,00 (hetta er ein meting frá TK, ein kostnaðarmeting kemur frá Kontrast seinni)

| | |
|---|---|
| samanlagt | 1.365.500,00 kr. u/MVG |
| | 1.450.843,75 kr. v/6,25% MVG |

Kostnaðarmetingin av umbyggingini av Tjarnargarði sum bleiv gjørd var 23,8 mio. kr. Um omanfyrinevndu tillagingar skulu gerast heldur henda kostnaðarmeting ikki.

Við tillagingunum verður nýggja kostnaðarmetingin samla 25,3 mio kr.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á húsaumsitingini mæla til at taka undir við, at omanfyrinevndu broytingar verða gjørdar í samband við umbyggingina av Tjarnargarði og at játta 1.5 mio kr. til endamáli.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við broytingunum og at játtanin verður fingin til vega á íløguætlanini og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Útbjóðingartilfarið uppá út- og umbygging av Tjarnargarði frá ráðgevum er nú liðugt og endalig kostnaðarmeting fyriliggur. Endalig kostnaðarmeting fyri verkætlanina er hægri enn áður mett. Samlaður verkætlanarkostnaður áðrenn licitatión verður mettur til 35 mió kr. við øllum. Handverkaraútreiðslur eru leypandi vorðnar hægri, umframt at summar útreiðslur ikki hava verðið íroknaðar áður. Útreiðslur til kommunalt mvg. hava ikki verið íroknaðar frá byrjan, umframt at við nýggjastu kostnaðarmetingini eru

íbindingargjøld, lønar- og prísvøkstur og umsitingarkostnaðir við. Harafturat hava útreiðslur til innbúgv og útgerð ikki verðið partur av kostnaðarmetingini, og hesar eru tiknar við nú.

Í samlaða kostnaðinum nú er: 7 nýggj umlætingarpláss, uppraðfesting av venjingarhølum og dagtilhaldinum, nýggjur ídnaðarkøkur og samanbinding av báðum høvuðsbygningunum. Øll ovara hædd verður gjørd av nýggjum, og fleiri fermetrar verða tí til venjingar og dagtilhald, umframt at stórur partur av bygninginum verður høvuðsumvældur har neyðugar ábøtur verða gjørdar viðv. m.a. brunaviðurskiftum og ventilatón.

Eftir ætlan skal útbjóðingartilfarið sendast teimum bjóðandi í viku 44.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á verkætlanardeildini mæla til at taka undir við omanfyri nevndu ætlan, og at karmurin fyri verkætlanina verður hækkaður samsvarandi nýggju kostnaðarmetingini.

Eldranevndin 09. oktober 2018: Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sp/f Kontrast hava bjóðað arbeiðið út í innbodna lisitatión. Arbeiðstakararnar eru: P/F Articon, og Sp/f Búsetur, Sp/f JEP Smíð, P/F MTHøjgaard, Sp/f Húsavarðartænastan og Sp/f Eysturlon.

Tilboðini eru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| Articon: | 21.673.531,80 kr uttan mvg. |
| Búsetur: | 23.471.810,00 kr --- // --- |
| JEP Smíð: | 25.810.304,41 kr --- // --- |
| MTHøjgaard: | 28.486.394,00 kr --- // --- |
| Húsavarðartænastan: | 28.643.768,00 kr --- // --- |
| Eysturlon: | Tilboð ikki innlatið |

Kontrast Arkitektar og umsitingin eru farin í samráðingar við Articon, sum hevði lægsta tilboðið, til tess at útgreina tilboðið.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri verkætlanina at umbyggja gamla Tjarnargarð til demensdepil. Samlaði kostnaðurin framgongur í kostnaðarmetingini á j.nr. 18/04091-01. Kostnaðarmetingin er grundað á tilboðið hjá Articon, sum er lægsta tilboðið. Í kostnaðarmetingin er HVÚ, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging, innbúgv, køkur o.a. íroknað.

Fyri 2018 eru 3.049 mio kr. játtaðar til verkætlanina

**Tilmæli:**
Bygginevndin hevur á fundi 22. november 2018 viðgjørt tilboð og mælir bygginevndin til at játta samlaða kostnað av (kostnaðarmeting j.nr. 18/04091-01) av løgukarmi 2775 Eldrarøkt L00001 til løgukontu L27010 Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Mælt verður til at taka undir við tilboðnum hjá Articon P/F samsvarandi tilboðsupphædd og undirskrivað arbeiðstakarasáttmála.

Mælt verður samstundis til at játta løgukarmin soleiðis:

| | |
|---|---|
| 2018: | 7,9 mio kr. av karminum fyri 2018 |
| 2019: | 12,3 mió kr av karminum fyri 2019 |
| 2020: | 10 mió kr av karminum fyri 2020 |

**Eldranevndin 26. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við 1. byggistig av út- og umbygging av gamla Tjarnargarði eru komin viðurskifti fram, sum gera at byggingin hevur tørv á eini eykajáttan.

Fyrsta byggistig hevur havt væl størri avbjóðingar við sær, enn roknað var við.

Fleiri eru orsøkirnar fyri at verkætlanin er dýrka. M.a. er talan um rokningar fyri vantandi projektering, eyka byggiharra útreiðslur, meir- og minniveitingar og ókent.

Umsitingin hevur gjørt eina dagførda kostnaðarmeting og staðfestast kann, at tørvur er á eini eykajáttan á kr. 3.984.375 kr.

Útgreining er viðløgd.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á Húsaumsitingini mæla til, at taka undir við at játta 3.984.375 kr. eyka av konto 6175 umsiting og røkt av fastari ogn, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 15. juni 2020:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Annfinni Brekkstein um at beina málið aftur í nevnd, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn og Bogi Andreasen.

Málið beint aftur í eldranevndina.

**Iskoyti:**
Forkvinnan í eldranevndini ynskir málið á skrá.

**Eldranevndin 08. juli 2020:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at halda fast við samtyktina í eldranevndini 15. juni 2020 og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 08. juli 2020:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Heðini Mortensen, Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen og Høgna Joensen:

Vísandi til at verkætlanin at umbyggja Tjarnargarð er vorðin munandi dýrari enn upprunaliga mett, og at tað nú, verkætlanin átti at verið liðug, er komið fram, at tað millum annað mangla pengar til projektering, setir minnilutin sum treyt fyri at játta írestandi upphæddina, at býráðið setur í verk eina djúptøkna kanning av møguligum feilum og mistøkum í fyrireiking, umsiting og verkseting av verkætlanini, og at býráðið fer undir at viðgera neyðugar avleiðingar av niðurstøðum í kanningini.

Við hesari treyt tekur minnilutin undir við at játta ta upphædd, sum er neyðug til tess at byggingin verður liðug og búfólkini kunnu flyta inn sum skjótast.

Broytingaruppskotið fall við fýra atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Høgni Joensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Síðandi varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini 17. juni 2020 og einum meiriluta í eldranevndini 8. juli 2020, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 blonkum atkvøðum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Høgni Joensen og Annfinn Brekkstein.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Annika Olsen setti fram broytingaruppskot um at taka undir við málinum sum samtykt við fyrstu viðgerð, og at Articon tekur yvir arbeiðstøkuna av byggistigið 2.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Anniku Olsen, ið varð einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við liðugtgerð av verkætlanini at út- og umbyggja gamla Tjarnargarð til demensdepil er staðfest, at tað skal ein meirjáttan til.

Sum áður staðfest, varð fyrsta byggistig, sum varð liðugt á sumri 2020, sera nógv seinkað og hevði stórar avbjóðingar. Ein seinkan á uml. 8 mánaðir.

Í september 2020, eftir umleið tveir mánaðir av byggistigið 2, varð gjørt av, at høvuðsráðgevin ikki skuldi halda á fram. Tó hava undirráðgevarar verið við. Hesir hava ábyrgd av konstruktiónum, bruna, EL, HVS og ventilaión.

Vónað varð tá, at møguleiki var fyri at fáa verkætlanina lidna um ársskiftið. Hetta hevur ikki hildið, og verður høvuðsarbeiðstøkan íroknað allar meir-, minni og eykaveitingar avhandað 10. mars 2021.

Av tí at sera stórar avbjóðingar hava verið við hesi verkætlanini, er hon nógv dýrkað. Samlaði eykakostnaðurin fyri at um- og útbyggja gamla Tjarnargarð til demensdepil, verður væntandi umleið 6,95 mió. kr.

Á býráðsfundi 25. august 2020, samtykti býráðið eina eykajáttaðan á 3,95 mió. kr.

Á byggifundi 19. oktober 2020, varð staðfest, at ein tørvur er aftur at á eini eykajáttan á uml. 2,6 mió. kr.

Síðani eru aðrar óvantaðar útreiðslur, á uml. 0,4 mió. kr. komnar afturat, so at neyðugt er við eini eykajáttan á 3,0 mió kr og ikki 2,6 mió. kr, sum fráboðað á byggifundi í oktober 2020.

Á bygginevndarfundi 01.03.2021 varð staðfest at tørvurin á eykajáttan er 3 mió. kr.

Eykajáttanin á 3,0 mió. kr. er í høvuðsheitum farin til meir- og eykaveitingar í sambandi við høvuðsarbeiðstøkuna. Til dømis brunaatskiljing og brunaverju, HVS og ventilatión, køk, gólv, máling og annars óvantaðar útreiðslur. Undir óvantaðar útreiðslur eru t.d. ymiskar óvantaðar broytingar og manglar, serliga í sambandi við EL-arbeiði, net og antennustik, ABDL- og ABA-skipanir.

Viðlagt er yvirlit yvir samlaða metta kostnaðin, samanborið við upprunaligu kostnaðarmetingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, verkætlanarleiðarin, Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á Húsaumsitingini mæla Heilsu- og eldranevndini til, at játtaðar verða 3.000.000,00 kr. til verkætlanina, fíggjað við 1.000.000 kr. av konto 2375, L00001, Løgukarmur fyri árið, og 2.000.000 kr. av konto 2775, L27013 Eldradepil í Kollafirði, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 09. mars 2021:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk og Kári Johansen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annika Olsen og Birgir Nielsen, tekur undir við at gera Tjarnargarð lidnan, men at játtanin verður funnin aðrastaðnis á fíggjarætlanini.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í heilsu- og eldranevndini og játtar 3.000.000,00 kr. til verkætlanina, fíggjað við 1.000.000 kr. av konto 5775, L57015, Langhylur, og 2.000.000 kr. av konto 2775, L27013 Eldradepil í Kollafirði, og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur ikki undir við meirilutanum í Heilsu- og eldranevndini. Minnilutin tekur undir við at gera Tjarnargarð lidnan, men mælir til at játtan verður funnin aðrastaðni á fíggjarætlanini.
**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð við fyrstu viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.
**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Heðin Mortensen legði fram broytingaruppskot um at taka undir við uppskotinum sum samtykt við fyrstu viðgerð við teirri broyting, at játtaðar verða 1.000.000 kr. av konto 2775, L27013 Eldraepil í Kollafirði og kr. 2.000.000 av konto 5775, L57015, Langhylur.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

Málið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Verkætlanin er liðug og gjørd upp. Verkætlanin hevur havt avbjóðingar í og við at talan var um um- og útbygging.  Støðan er nú, at leiðarin á Bygningsdeildini og stjórin á HU hava heitt er á verkætlanarleiðaran um at lokað verkætlanina. Á løgukontoini eru uml. 200.000,- kr. Eftir er at avgreiða liðugtgerð av samanbygning í millum gamla og nýggja Tjarnargarð, skifta og víðka ein serliga úthurð í rýmingarleiðini úr Kristianslon, umframt ymisk minni arbeiði. Hetta kann verða fíggjað av rakstrarkonto 6110.

**Tilmæli:**
Tekniski  stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:
1. At loka verkætlanina L27010 Út og umbygging av gamla Tjarnargarði til demensdepil
2. At restupphæddin á løgukontoini á uml. kr. 200.000 verður flutt út á karmin 2775.
3. At resterandi arbeiði kunnu verða fíggjað av rakstrarkonto 6110.
4. At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Heilsu- og eldranevndin 09. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Málið beint aftur í fíggjarnevndina.

## 123/23 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 19/17 | 17/03195-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 229/17 | 17/03195-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 239/17 | 17/03195-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 42/18 | 17/03195-1 |
| 5 Eldranevndin | 09.04.2018 | 1/18 | 17/03195-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 95/18 | 17/03195-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 75/18 | 17/03195-1 |
| 8 Eldranevndin | 04.06.2018 | 2/18 | 17/03195-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 171/18 | 17/03195-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 147/18 | 17/03195-1 |
| 11 Eldranevndin | 10.09.2018 | 9/18 | 17/03195-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 254/18 | 17/03195-1 |
| 13 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 211/18 | 17/03195-1 |
| 14 Eldranevndin | 05.11.2018 | 15/18 | 17/03195-1 |
| 15 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 77/18 | 17/03195-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 248/18 | 17/03195-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 332/18 | 17/03195-1 |
| 18 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 270/18 | 17/03195-1 |
| 19 Eldranevndin | 19.03.2019 | 2/19 | 17/03195-1 |
| 20 Eldranevndin | 27.03.2019 | 9/19 | 17/03195-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 28.03.2019 | 94/19 | 17/03195-1 |
| 22 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 65/19 | 17/03195-1 |
| 23 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 103/19 | 17/03195-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 117/19 | 17/03195-1 |
| 25 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 90/19 | 17/03195-1 |
| 26 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 272/19 | 17/03195-1 |
| 27 Eldranevndin | 29.10.2019 | 20/19 | 17/03195-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 288/19 | 17/03195-1 |
| 29 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 243/19 | 17/03195-1 |
| 30 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 26/20 | 17/03195-1 |
| 31 Heilsu- og eldranevndin | 09.05.2023 | 12/23 | 17/03195-1 |
| 32 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 137/23 | 17/03195-1 |
| 33 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 123/23 | 17/03195-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýggjan depil til umlætting og samdøgursrehabilitering. Hetta tilmælið verður niðanfyri útgreinað.

Mett verður skilabest við depli við 30 plássum, sum í høvuðsheitum kunnu býtast í 10 samdøgursrehabiliteringspláss og 20 umlættingarpláss, ið tó skal hugsast fleksibult eftir tørvinum hjá brúkarunum.

Í løtuni hevur heilsu- og umsorganartænastan 11 umlættingarpláss og 5 samdøgursrehabiliteringspláss.

Samdøgursrehabiliteringspláss eru stutttíðarpláss til eldri fólk, sum við tilboði um endurmenning í styttri tíðarskeið kunnu fara heim aftur til sín sjálvs at búgva, møguliga stuðlað við heimahjálp. Til

samdøgursrehabilitering verður dentur lagdur á at endurmenna búfólkini og geva hjálp til sjálvhjálp gjøgnum venjing og annað.

Rehabiliteringstíðarskeiðið kann vera ymiskt alt eftir støðuni hjá einstaka borgaranum.

Umlættingarpláss eru eisini stutttíðarpláss til eldri fólk, sum búgva heima, men eru illa fyri. Tey koma til umlætting fyri at lætta um hjá avvarðandi, sum eru við til at taka sær av teimum í heiminum. Til ber at fáa afturvendandi umlætting, um mett verður, at tørvur er á tí. Tað er rættiliga vanligt, at fólk, sum fær tillutað fast røktarbúpláss, fyrst hevur verið til umlætting. Umlættingartíðarskeiði kann vera ymiskt alt eftir tørvi.

Umframt at vera týðandi tilboð til borgararnar, hava enn fleiri stutttíðarpláss til umlætting og rehabilitering stóran skipanarligan týdning fyri skipan av samlaðu heimatænastuni, harundir starvsfólkatørv, og til ber betri at tálma tørvin á nýggjum røktarheimsplássum. Tað ber eisini betri til at taka ímóti bráðfeingis støðum, liðugt viðgjørdum sjúklingum v.m., og somuleiðis kunnu fleiri stutttíðarpláss tryggja betur visitatión.

Nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin er hugsaður sum ein deild, har mestsum øll umlætting og samdøgursrehabilitering í Heilsu- og umsorganartænastuni fer fram.
Við hesi støðd fæst bæði fakligur og tænastuligur fleksibilitetur og skynsamur rakstur.

Í dag fáa umleið 40 fólk um árið gagn av tilboðnum um samdøgursrehabilitering, og vanliga standa eini 10 fólk á bíðilista. Við at økja plássini til 10 pláss, skuldi rúm verið fyri, at 80 heimabúgvandi um árið kunnu brúka samdøgursrehabiliteringstilboðið.

Viðvíkjandi umlætting, so kunnu 10 av teim 30 plássunum verða nýtt til fólk, sum hava afturvendandi tørv á umlætting t.d. 3-4 ferðir um árið. Tá vilja millum 30 og 40 fólk gagnnýta hesi 10 plássini. Higartil í ár (sept. 2017) hevur Heilsu- og umsorganartænastan fingið 224 áheitanir um umlætting. Hetta er bæði frá borgarum, sum hava fingið umlætting í ár, og frá borgarum, sum senda áheitan fyrstu ferð.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur veitt umlætting 157 ferðir í ár. Longdin á teimum 157 umlættingunum, sum hava verið higartil í ár, er ymisk. Tað vil siga, at higartil í ár eru 67 áheitanir, sum ikki eru gingnar á møti.

Restina av teimum 30 plássunum, t.e. eisini 10 pláss, kunnu brúkast til bráðfeingispláss, liðugt viðgjørdar sjúklingar, sonevnd metingarpláss og onnur, sum hava ikki so ofta tørv á umlætting, t.d. bert eina til tvær ferðir um árið.

Upplagt er, at liðugt viðgjørdir sjúklingar, sum ikki kunnu fara heim av sjúkrahúsinum, koma á depilin til metingar og til uppvenjing, har tað betri ber til at meta um og staðfesta, hvørt borgarin kann fara heim ella skal hava búpláss á røktarheimi.

Hesin býtislykil millum rehabilitering, umlætting og bráðfeingis pláss er ikki endaligur, men skal júst vera fleksibul í mun til áleikandi tørv.

Við deplinum er møguligt at flyta verandi umlættingarpláss, t.e. 2 á Lágargarði og 2 á Boðanesheiminum, og tey 5 samdøgursrehabiliteringsplássini á Boðanesheiminum, til depilin. Hesi 9 stutttíðarplássini verða so løgd um til føst búpláss, ið tað eisini er tørvur á.

Umframt at fáa 9 nýggj føst bupláss, so ger hetta eisini, at allar røktardeildir í Heilsu- og umsorganartænastuni eru røktardeildir burturav. Hetta er meira skynsamt fyri deildirnar, sum í dag eisini fast hýsa umlætting og samdøgursrehabilitering, tí tað viðførir størri stabilitet og frið við sær.

Við at byggja 30 pláss verður mett møguligt eisini at endurnýggja tey sjey plássini á Umlættingarheiminum í V.U. Hammershaimbsgøtu, tvs. niðurleggja virksemið har. Fysisku karmarnir hava leingi verið ótíðarhóskandi og illa egnaðir til røktartørvandi og demenssjúk fólk, og rakstrarliga er talan um lítla og tí lutfalsliga kostnaðarmikla eind.

Við hesi loysnini verða sostatt: 7 umlættingarpláss endurnýggjað, 9 pláss umløgd til føst búpláss, tá umlættingin flytur í umlættingar- og rehabiliteringsdepilin, og 14 nýggj stutttíðarpláss fingin til vega aftrat teimum, sum eru í dag.

Við deplinum økist dekningsstigið, t.e. lutfallið av búplássum í mun til talið av fólki eldri enn 80 ár, bæði á føstum røktarbúplássum og á stutttíðarbúplássum, sí kolonnu fyri árið 2018 í talvuni niðanfyri, har ætlanin við 8 nýggjum umlættingarplássum til demenssjúk á Tjarnargarði (j.nr. 17/02942) eisini sæst í kolonnu fyri ár 2020.

Verkætlanartilgongd:
Ætlanin er, at depilin skal vera í rakstri seinnu hálvu av 2018. Farast skal tí beinanvegin undir at gera nærri tørvs- og kravlýsing umframt skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, kostnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri eldranevndina í seinasta lagi til nevndarfundin 27. november 2017.

Staðseting og lendið kann hava ávísan týdning fyri bygningsloysn, og tí eigur at verða biðið um staðseting og grundøkið beinanvegin.

Til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. verður mett neyðugt við upphædd kr. 500.000 at játta av tøkum íløgukarmi 2775 eldrarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at byggja nýggjan umlættingar- og samdøgursrehabiliteringsdepil við 30 plássum at standa klárt at taka í nýtslu í seinnu hálvu av 2018, og í hesum sambandi:

- at gera tørvs- og kravlýsing og skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, konstnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri nevndina aftur til nevndarfundin 27. november 2017,

- at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um staðseting, og

- at játta kr. 500.000 til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. av íløgukontu 2775 eldarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Eldranevndin 02. oktober 2017**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við verkætlanina at byggja ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil hevur býarskipanardeildin arbeitt við møguligum staðsetingum til verkætlanina. Í mun til býarplanleggingina og staðseting av almennum stovnum vísir umsitingin á eitt økið við endan av Rólantsgøtu í Hoyvík, ið liggur náttúruvakurt upp at dalinum Langa, sí kortskjalið *Rólantsgøta_kort.*

Økið er partur av matrikklunum 135fe og 138a, ogn hjá Tórshavnar kommunu, sum eru væl størri, enn hvat tørvur er á, og skal ein depil til fólk byggjast, má hóskandi øki til tess frámatrikulerast. Byggingin skal somuleiðis skipast í mun til ein byggilinju, ið skal tryggja, at byggingin leggur seg eftir bygda umhvørvinum, og at ein hóskandi frástøða til verandi gøtu og frílendi verður hildin.

Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er økið ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Soleiðis er ein umlættingar- og rehabiliteringsdepil ikki í stríð við almennu byggisamtyktina. Men í sambandi við útstykkingar í A3 øki skal serstøk byggisamtykt gerast.

Byggitørvurin á deplinum er áleið 2000m$^2$. Mest loyvda byggistig í A3 øki er 0,3, og er sostatt tørvur á einum grundstykki áleið 6000-6500m$^2$ til støddar. Talan er um bygging í einari hædd við 30 kømrum við bað og duri, venjingarhøli, uppihaldsøki við serveringskøki, vaskarí, goymslur.

Ein bústaður til umlætting hóskar seg væl í einum øki, sum longu er merkt av at vera bústaðarøki. Fríøki er nærmasti granni til ætlaðu byggingina, og stuðlar tað væl undir virksemið, at fólk búgva til umlætting í eitt styttri tíðarskeið.

Sama økið var einaferð ætlað til dagstovn í Hoyvík, men er hetta ikki aktuelt longur.

**Skjøl:**
Økið við Rólantsgøtu, journal nr. 17/03195-5
Rólantsgøta_kort, journal nr. 17/03195-6

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at samtykkja nevndu staðsetingina til ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, at sundurbýta uml. 6500m$^2$ av matr.135fe og 138a, at gera nýggja serstaka byggisamtykt og at beina málið í eldranevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina omanfyri.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin mælir til at eldranevndin tekur undir við staðsetingini sum er ávíst og sum er samtykt av byggi- og býarskipanarnevndini, og at beina málið víðari í fíggjarnevndina og býráðið.

**Eldranevndin 09. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykti at taka undir við Eldranevndini og senda málið til kunningar/viðmerkingar hjá eigarafelagnum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigursson um at beina málið aftur í nevnd.

Einmælt samtykt at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Tørvslýsing

Til tess at gera tørvslýsingina, ið er grundarlag fyri ítøkiligari byggiskrá, so kvalifiseraða sum gjørligt, er valt at taka brúkaraumboð við servitan innan allar funktiónir við í arbeiðið. Hesi eru ein ergoterapetur, ein fysioterapeutur, ein køksleiðari og deildarleiðarin fyri verandi rehabilitering/umlætting. Harafturat hevur ein eindarleiðari verið við til tess at tryggja skynsemi í rakstri, tá bygningurin er liðugur og tikin í nýtslu.

Í stuttum verður mælt til 28 pláss býtt í tvær lonir. Við støði í hesum er gjørd meting um starsvfólkanormering og rúmskrá, umframt onnur yvirskipað viðurskifti. Talan verður eftir hesum um bygning uml. 1.800 fermetrar.

Sí tørvslýsing í hjalagda skjalið.

Í ætlan liggur at byggja depilin við Rólantsgøtu í Hoyvík. Hoyring hevur verið hjá eigarafelagnum, og er ynskið borið fram um, at bygningurin skal vera í einari hædd og hava flagtekju.

Brúkaraumboð hava serliga lagt dent á at køkur eigur at verða partur av umlættingar og rehabiliteringsdeplinum. Tí umframt tað heimliga og hugnaliga við at matur verður gjørdur á staðnum, so er kostur ein sera týðandi partur av rehabiliteringini og skal tillagast til einstaka borgarar.
Lágargarður er við at vera á markinum fyri hvussu nógvar døgurðar afturat køkurin megnar at gera afturat tí sum verður gjørt í dag.

Bygginevndin hevur góðkent tørvlýsingina, og klárt er tí at fara undir at gera byggiskrá, tíðarætlan og kostnaðarætlan.

Mett verður skilagott, at eldranevndin eisini umrøður tørvslýsinga til tess at tryggja felags fatan um verkætlanina.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla eldranevndini til, at taka undir við tørvslýsingini sum grundarlag fyri víðari arbeiðinum at gera byggiskrá v.m.

**Eldranevndin 04. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Eigarafelagið hevur í hoyringssvari gjørt vart við, at um kommununa velur at brúka økið í Rólantsgøtu til annað enn barnagarð, hevur eigarafelagi rætt til endurgjald.

Umsitingin hevur kannað hetta hjá løgfrøðinginum, sum arbeiddi við avtaluni við eigarafelagið og løgfrøðiliga niðurstøðan er henda:

Kommunan hevur luttikið í útstykkingararbeiðinum og hevur tá goldið fyri 2.500 m2 . Ætlanin var at byggja barnagarð á øki.

Løgfrøðiliga metingin er, at kommunan hevur goldið fyri hetta øki og tí ikki eigur at  gjalda einaferð afturat, um kommunan velur at byggja annað enn barnagarð á øki. Um kommunan ætlar at brúka meira enn 2.500 fermetrar, eigur kommunan at gjalda eigarafelagnum fyri tað, sum fer upp um 2.500 fermetrar. Tann kostnaðurin má avtalast nærri við eigarafelagið.

Tann løgfrøðiliga metingin er, at um kommunan ikki fer upp um teir 2.500 fermetrarnar, eigur kommunan ikki at gjalda eigarafelagnum nakað, tí goldið er longu fyri 2.500 fermetrar.

Enn er ikki greitt hvussu stórur ein umlættingar/rehabiliteringsdepil verður og tí er ilt at siga um kommuna hevur tørv á meira enn 2.500 fermetrum. Heldur ikki ber í løtuni til at siga hvat ein evt. kostnaður vildi verið um tørvur er á meira enn 2.500 fermetrum

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og virkandi leiðari á stjórnarskrivstovuni mæla til at Fíggjarnevndin gevur umsitingini heimild at samráðast við eigarafelagi um evt. kostnað um kommunan hevur tørv á lendi sum er størri enn 2.500 fermetrar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við staðsetingini og at heimila umsitingini at samráðast við eigarafelagið um evt. kostnað um lendi størri enn 2.500 fermetrar. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Ruth Vang og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Bjørg Dam og Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Anfinn Brekkstein.

**Ìskoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi 05.09.18 samtykt at bjóða Umlættingar- og rehabiliteringsdepilin út sum totalentreprisa ætlandi til tríggjar arbeiðstakarar. Tá bjóðað verður út sum totalentreprisa er vanligt, at tey, sum ikki fáa projektið, verða samsýnt fyri teirra uppskot. Til hetta endamál metir tekniska fyrisiting, at tørvur er á 300.000 kr.

Harumframt er tørvur á at gera lendiskanningar av staðsetingini, áðrenn útbjóðingartilfarið kann gerast liðugt. Til hetta krevst 100.000 kr.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla eldranevndini til at játta 400.000 kr. til 2775 Eldrarøkt (íløgur) L 27011 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil av 2775 Eldrarøkt (íløgur) L00001 Løgukarmur fyri árið og leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 10. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam og Odd Færø.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Byggiskráin/útbjóðingartilfarið er í gerð til umlættingar- og rehabiliteringsdepilin. Mett er um heildarkostnað fyri verkætlanina. Sí kostnaðarmeting j. nr 18/03889  Ætlanin er at bjóða verkætlanina út í heildararbeiðsstøku  í desember 2018. Tilboðini skulu verða TK í hendi í februar 2019. Mett byggitíð er 18 mánaðir. Arbeiðið at byggja umlættingar- og rehabiliteringsdepilin byrjar eftir ætlan í apríl 2019 og avhending  í oktober 2020.

Verkætlanin verður boðin út í heildararbeiðstøku til 3 arbeiðstakarar:

Sp/f Húsavarðartænastuna,
P/F Articon
P/F MT Højgaard.

**Tryggingarviðurskifti:**
Teknað verður all-risk trygging, men ivasamt er um tað ber til at tekna verkætlanarábyrgdartrygging í heildararbeiðstøku sambært tryggingarráðgeva hjá TK.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, Verkætlanardeildarleiðarin og tekniski stjóri mæla til, at umsitingin arbeiðir eftir omanfyristandandi leisti og fær heimild til at fara í sáttmálasamráðingar við vinnandi arbeiðstakara við møguligum tillagingum. Mælt verður somuleiðis til at samtykkja kostnaðarmetingina, sí j. nr. 18/03889. Vísir tað seg, at ein arbeiðstakari meldar frá, verður mælt til, at umsitingin bjóðar nýggjum  arbeiðstakara við at veita tilboð. Málið verður lagt fyri aftur eldranevnd, fíggjarnevnd og býráðið til støðutakan eftir sáttmálasamráðingarnar.

**Eldranevndin 05. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Nevndin ynskir at elementir ella modulir kunnu verða positivt nevnd í útbjóðingini sum ein møguleiki, umframt at tilboðsveitarar  kunnu koma við einum alternativum uppskoti.

**Ískoyti:**
Sambært ásetingunum fyri A3 øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini skal serstøk byggisamtykt gerast fyri nýggjar útstykkingar. Ásetingarnar fyri útstykkingina við Rólantsgøtu í Hoyvík, sum fevnir um grundstykkir á 300 $m^2$, eru ásettar í skeytið fyri hvørt grundstykkið, og tískil er ongin serstøk byggisamtykt fyri økið. Nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin er partur av hesi útstykkingini, tískil verður kunnað um, at ásetingarnar fyri nýggja stovnin somuleiðis verða ásettar í skeytið.

Økið, sum er samtykt til nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, er partur av matriklunum 135fe og 138a, ogn hjá Tórshavnar kommunu, sum eru væl størri enn hvat tørvur er á. Eitt øki áleið 4900 $m^2$ skal tí sundurbýtast frá matr. 135fe, umframt at eitt øki áleið 1700 $m^2$ skal sundurbýtast frá matr. 138a til samanlegging við sundurbýtið frá 135fe. Nýggi matrikulin verður sostatt áleið 6.600 $m^2$ til støddar, sí uppskot til sundurbýtið og samanlegging á kortskjalinum *Rólantsgøta_marknaumskipan*.

**Skjøl:**
*Rólantsgøta_marknaumskipan*, journal nr. 17/03195-21.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at sundurbýta eitt øki frá matr. 135fe og 138a at samanleggja til ein nýggjan matrikul áleið 6.600 $m^2$ til nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, sum verður at senda til Umhvørvisstovuna til avgreiðslu, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður ímóti og mælir til at stovnarnir, sum kommunan í framtíðini finnur staðseting til, verða staðsettir í nýggjum áhugaverdum umhvørvi í Stórutjørn í Hoyvík.

Annfinn Brekkstein atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við eldranevndini 5. november 2018 og meirilutanum í teknisku nevnd 27. november 2018 og beina málið í býráðið og málið um sundurbýtið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson atkvøður ímóti og mælir til, at stovnarnir, sum kommunan í framtíðini finnur staðseting til, verða staðsettir í nýggjum áhugaverdum umhvørvi í Stórutjørn í Hoyvík.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti og mælir til at stovnarnir, sum kommunan í framtíðini finnur staðseting til, verða staðsettir í nýggjum áhugaverdum umhvørvi í Stórutjørn í Hoyvík.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutunum í fíggjarnevndini og byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 2 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu:  Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjøghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Bjørg Dam

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

**Eldranevndin 19. mars 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Eftir at byggiskráin til umlættingar- og rehabiliteringsdepilin (URD) varð liðug, bleiv verkætlanin boðin út 6. desembur 2018, í heildararbeiðstøku til 3 heildararbeiðstakarar, tað er:

- Sp/f Húsavarðartænastan
- P/F Articon
- P/F MT Højgaard.

Tilboðini komu inn 7. marts 2019, og liggja í j.nr. 18/03889-3

Dómsnevnd, mannað við 7 fólkum við viðkomandi førleikum, hevur síðani neyvt gjøgnumgingið øll trý tilboðini og mett tey út frá útbjóðingartilfarinum. Eftir at tilboðini eru gjøgnumgingin og viðgjørd, hevur dómsnevndin gjørt dómsnevndarálit, sum er lagt fram fyri bygginevndina, sum tekur undir við úrslitinum.

Dómsnevndarálitið framgongur á j.nr. 18/03889-4

Um býráðið tekur undir við tilmælinum, er næsta stig, at kommunan fer undir  sáttmálasamráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara. Tá sáttmáli er gjørdur, skal heildararbeiðstakarin gera myndugleikaprojekt í tøttum samstarvi við kommununa og fáa til vega øll neyðug loyvir.

Út frá vinnandi uppskotinum hevur umsitingin gjørt eina samlaða kostnaðarmeting  fyri verkætlanina, sum er íroknað HVÙ, prosjektumsiting, trygging o.a., sum sæst á j.nr. 18/03889-2.

Ætlanin er at hava framløgu fyri býráðslimunum mikudagin kl. 15.00, har øll uppskotini verða víst fram og har kunnað verður um dómsnevndararbeiðið.

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, verkætlanardeildarleiðarin og tekniski stjórin mæla til:
- at taka undir við dómsnevndarálitinum og fara undir sáttmálasamráðingar og gera sáttmála við vinnandi heildararbeiðstakara.
- at játta kr. 23 mió. í 2019 av tøkum løgukarmi konto 5775 L0001 løgukarmur fyri ári og L0002 framfluttar løgur og at játta restina av kostnaðinum sambært kostnaðarmeting j.nr. 18/03889-2 á fíggjarætlanini í 2020.

at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 27. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. mars 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle, Bergun Kass og Halla Samuelsen, mælir býraðnum til at taka undir við dómsnevndarálitinum og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara. Málið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevnd og býráð.

Ein minniluti, Tróndur Siguðsson, tekur undir við at gera ein umlættingardepil, men mælir til at staðseta umlættingardepilin við Stórubrekku saman við barnagarðinum, ið ætlanin er at staðseta har.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari í móti og 5 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson, Odd Færø, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara, MT Højgaard Føroyar, til tess at finna sparingar á verkætlanina.

Út frá sparingum frá MT Højgaard Føroyar hevur umsitingin gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri verkætlanina, sum er íroknað HVÙ, prosjektumsiting, trygging o.a., sum sæst á j.nr. 18/03889-9.

Um býráðið tekur undir við tilmælinum er næsta stig, at kommunan fer undir sáttmálasamráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara. Tá sáttmáli er gjørdur, skal heildararbeiðstakarin gera myndugleikaprosjekt í tøttum samstarvi við kommununa og fáa til vega øll neyðug loyvir.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, verkætlanardeildarleiðarin og tekniski stjórin mæla til:
- at taka undir við dómsnevndarálitinum og fara undir sáttmálasamráðingar og gera sáttmála við MT Højgaard Føroyar.

- at játta kr. 23 mió. í 2019 av tøkum løgukarmi konto 5775 L0001 løgukarmur fyri ári og L0002 framfluttar løgur og at játta restina av kostnaðinum sambært kostnaðarmeting j.nr. 18/03889-9 á fíggjarætlanini í 2020.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, tveimum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund til umrøðu og støðutakan.

**Ìskoyti**
Ósemja hevur verið millum Tórshavnar kommunu, grannar og eigarafelag um verkætlanina URD. Òsemjan liggur í kjalarvørrinum á eini avtalu frá 13. feb. 2003 millum Tórshavnar kommunu og Eigarafelagið Hoyvíkshædd(EiH).

Grannar kenna seg ikki hoyrdan og meta, at tað fer at verða bygt ov høgt og ov tætt við húsini. Nógv samskifti hevur verið millum borgarstjóra, umsiting og EIH. Til seinni fundir hevur EIH havt Mimi Steintórsdóttir, advokat við.

EiH hevur roknað seg fram til, at TK sambært avtaluni frá 2003, skal rinda uml. 2,6 mió. kr. fyri at leggja seg á ta vídd av lendi, sum tørvur er á til URD.

**Tórshavnar kommunu og EIH eru komin ásamt um uppskot til semju.**

**Punkt 1**
Tórshavnar kommuna kemur við alternativari loysn at taka einans 1 búpláss við Sivjugøtu, sum svarar til at bygningurin URD minkar á leið 4-5 metrar?

**Punkt 2.**
Tórshavnar kommuna kemur við alternativari loysn at minka um geiran framvið garðunum á 0,5 til 1 metur við grót bakkanti, sum t.d. er brúkt í verkætlan við hvítanesvegin hjá arbeiðstakaranum, Konsax. Síðani verður hesin geirin plantaður við runnum og trøum

**Punkt 3**
Kota 121.70. Hetta tann kotan, sum bygt verður eftir, so her er í lagi.

**Punkt 4**
Verður eisini mett at verða í lagi, at vegurin fram við URD verður gjørdur blindur.

**Punkt 5**
Verður eisini mett at verða í lagi, at vegurin ikki verður hægri enn myndin við svørtu strikuni vísir.

Eigarafelagið góðtekur semingsuppskotið um nýtsluna ímun til pkt 1-5, men góðtekur ikki at fráskriva sær gjaldið. Eigarafelagið hevur roknað hetta endurgjaldskravið at vera 2,6 mió kr.

Um TK byggir URD í mun til pkt 1-5, góðtekur eigarafelagið nýtsluna av lendinum, og vil eigarafelagið framyvir taka væl ímóti bygninginum og teimum, sum koma at virka har.

**Bygginevndin**
Bygginevndin hevur á fundi 27.07.19 og 29.10.19 gjørt ta niðurstøðu, at byggingin eigur at halda fram sum samtykt. Hóast fyrispurningur tá var at lækka bygningin, so er í stóran mun sama grundgeving galdandi. Kommunan heldur allar ásetingar í mun til byggingina og tí er trupult hjá bygginevndini at koma til aðra niðurstøðu enn, at verandi verkætlan heldur fram.

Hinvegin skilur bygginevndin støðuna um ósemjuna við grannarnar, men metir at hetta er ein politisk avgerð og leggur tí málið til politiska viðgerð, sí fundarfrásøgn hjá bygginevnd j.nr. 18/00270-12.

**Tilmæli**
Heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjórin og deildarleiðarin fyri verkætlanardeildina mæla til:
- at nevndin tekur støðu til uppskotið og beinir málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.
- at umsitingin setur upp fíggjarligu avleiðingarnar av broytingunum, at leggja fyri nevndina.

**Eldranevndin 29. oktober 2019:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, tekur undir við fyriliggjandi uppskoti punkt 1-5.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, heldur fast í samtykta projektið.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Eldranevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Siguðsson og Heðin Mortensen atkvøður ímóti samtyktini hjá meirilutanum í Eldranevndini, og vísur á áður gjørdar samtyktir um at staðseta umlættingardepilin við Stórubrekku saman við barnagarðinum, ið ætlanin er at staðseta har

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt var um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndin, ið varð samtykt við 7 atkvøðu fyri, 6 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um tryggingarviðurskifti.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Leiðarin á verkætlanardeildini kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Verkætlanin er liðug og gjørd upp. Arbeiðið hevur sum heild gingið væl. Verkætlanin hevur eina meirnýtslu uppá 321.000. Orsøkin er m.a., at kr. 300.000 av játtanini eru fluttar til 6110 Bygningsrakstur fyri keyp av mannskapsskúrum.

*Tá verkætlanin L27010 Tjarnargarður er lokað, eru kr. 200.000 tøkar á karminum á 2775.*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

5. At loka verkætlanina L27011 URD - Umlættingar- og rehabiliteringsdepil.
6. At meirnýtslan verður fíggjað við kr. 200.000 av karminum á 2775. Og at restin kr. 121.000 verður fíggjað av konto L61025 og restin við flyting av játtan frá 6110 Bygningsrakstur.
7. At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Heilsu- og eldranevndin 09. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt.

## 124/23 Ljósregulering við Eystara Ringvegur/Hvítanesvegur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 120/14 | 14/02605-15 |
| 2 Tekniska nevnd | 26.05.2014 | 144/14 | 14/02605-15 |
| 3 Tekniska nevnd | 14.03.2017 | 23/17 | 14/02605-15 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 70/17 | 14/02605-15 |
| 5 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 95/17 | 14/02605-15 |
| 6 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 59/18 | 14/02605-15 |
| 7 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 281/18 | 14/02605-15 |
| 8 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 244/18 | 14/02605-15 |
| 9 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 273/18 | 14/02605-15 |
| 10 Tekniska nevnd | 12.02.2019 | 6/19 | 14/02605-15 |
| 11 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 42/19 | 14/02605-15 |
| 12 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 37/19 | 14/02605-15 |
| 13 Býráðsfundur | 14.03.2019 | 51/19 | 14/02605-15 |
| 14 Tekniska nevnd | 04.06.2019 | 42/19 | 14/02605-15 |
| 15 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 172/19 | 14/02605-15 |
| 16 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 156/19 | 14/02605-15 |
| 17 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 176/19 | 14/02605-15 |
| 18 Tekniska nevnd | 17.04.2023 | 24/23 | 14/02605-15 |
| 19 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 139/23 | 14/02605-15 |
| 20 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 124/23 | 14/02605-15 |

# Lýsing av málinum – samandráttur:

Ætlanin er at fáa gjørt eina kostnaðarmeting fyri at fáa sett upp ljósregulering á vegamótinum Ringvegur/Hvítanesvegur.

Á fíggjarætlanini fyri 2012 eru avsettar kr. 1,5 mió. til Eystari ringv./Hvítanesvegur – ljósregulering, á konto fyri íløgur, nr. 8175.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 200.000,- fíggjað av kto. 8175 fyri íløgur fyri vegir 2012, til at gera ferðslumeting og kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur. Mælt verður eisini til at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 14. februar 2012:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina. Ein minniluti, Jan Christiansen, metir at besta ferðslu loysnin er, at gera eina rundkoyring og tekur tí ikki undir við at játta pening til ljósregulering.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, samtykkir at mæla býráðnum til at játta kr. 200.000,- fíggjað av kto. 8175 fyri íløgur fyri vegir 2012, til at gera ferðslumeting og kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Bogi Andreasen, vísir til støðuna hjá minnilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 23. februar 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um málið.

**Ferðslunevndin 30. mars 2012:** Kunnað varð um málið.

Umsitingin leggur fram fyriliggjandi skitsu uppskot j. nr 2012-0279/6.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Nógvir ivaspurnignar hava verið frammi um farast skal undir at gera rundkoyring ella ljósregulering. Ì hesum sambandi verður víst til fylgjandi mál:

1. Mál nr. 2002-1244 Rundkoyring við Hvítanesvegin/Eystara Ringveg viðv. uppskoti um rundkoryring upp á Diametur 37 m.

2. Mál nr. 2008-3700 Nevndarviðgerð: Rundkoyring Hvítanesvegur - Eystari Ringvegur, Diametur 30 m, kostnaður kr. 14.363.529,- sambært skjali nr. 2008-3699/4.

3. Mál nr. 2008-3699 Fíggjarviðurskifti: Rundkoyring Hvítanesvegur - Eystari Ringvegur viðv. tilboði upp á rundkoyring við ymsum diametrum.

4. Mál nr. 2007-3545 Fyrispurningur til Rambøll viðv. fyrimunum og vansum á vegaøkinum við Eystara Ringveg.

Fyri at fáa staðfest kostnaðin í dags prísum á rundkoyringum sambært omanfyri standandi málum, verður neyðugt at fáa kannað einleikaprísirnar fyri fyriliggjandi uppskotum. Tá hetta er gjørt, ber betri til at samanbera kostnaðarstøðið við uppskotið um ljósregulering á vegamótinum.
Til tess at fáa lýst fyrimunir og vansar ítøkiligari hvat sjálvari ferðsluni viðvíkur, við antin at gera rundkoyring ella ljósregulering, ber til at gera hetta við simuleringum av ferðsluviðurskiftunum á vegamótinum, sum ráðgevi hevur gjørt.

Umboð fyri Rambøll kemur at leggja fram simuleringar.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Umsitingin verður biðin um at koma við kostnaðarmeting av rundkoyring við hóskandi diametri og trafikkstýrdari ljosregulering at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sambært nevndarsamtykt 27.02.2013 saman við ráðgeva gjørt kostnaðarmeting.

**Tekniska nevnd 30. april 2014: Útsett.**

**Tekniska nevnd 26. mai 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**

Umsitingin hevur gjøgnumgingið málið av nýggjum. Tað hava verið fleiri loysnir havdar á lofti bæði við rundkoyringum og ljósregulering. Umsitingin metir, at besta og bíligasta ferðsluloysnin er ein ljósregulering.

Neyðugt er at eftirkanna prosjektuppskotið frá 2012 og at gera høvuðsprosjekt klárt til útbjóðingar. Tá høvuðsprosjektið er gjørt liðugt, verður greitt, í hvønn mun tað verður neyðugt at ogna sær lendi til verkætlanina.

**Víst verður til hesi skjøl**
TK j. nr. 17/00917-3 Rambøll Nyvig – Skitseforslag til overslag

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tikið verður undir við loysnini við ljósreguleringini á vegamótinum Hvítanesvegur-Eystari Ringvegur. Mælt verður eisini til at heita á ráðgevan um at gera høvuðsprosjekt klárt til útbjóðingar, og at játta kr. 400.000,- til endamálið av íløgukontoini fyri vegir, konto 8175, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 14. mars 2017: Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Turið Horn samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.**

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum, men at kostnaðarmeting fyri eina rundkoyring eisini fyriliggur, tá málið kemur aftur í nevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017: Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.**

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við málinum og mælir til, at ein kostnaðarmeting fyri eina rundkoyring fæst til vega, áðrenn støða verður tikin í málinum.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ljóskurvarnar við vegamótið Hvítanesvegurin – Eystari ringvegur, eru enn nakrar avbjóðingar við at fáa ferðsluna at glíða optimalt. Serliga vísir tað seg at vera torført at fáa ferðsluna at glíða á Eystara ringvegi, móti vegnum Yviri við Strond, í meldurtíðini. Bilrøðin kann strekkja seg, frá ljóskurvunum og heilt oman móti tyrlupallinum. Hetta ber í sær, at ferðslan frá Hoyvíksvegnum inn á ringvegin eisini verður tarnað.

Umsitingin hevur umrøtt hvør loysnin kann vera og er komin fram til at gera eina høgrasvingsbreyt. Hendan fer at stytta munandi um bilrøðina her, sí viðfestu mynd (Hvítanesvegur – ringvegur_breiðan.jpg). Samstundis skulu setast upp fleiri høgrapílar í vegamótinum.

Tekniska fyrisitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting frá ráðgeva á 1,3 mió. kr. uttan MVG fyri breiðkanina av Eystara ringvegi. Ætlanin er somuleiðis at breiðka Hvítanesvegin frá vegamótinum og oman til Hoydalsá. Her er mettur kostnaður umleið kr. 500.000, umframt útbygging av ljóskurvunum.

Í sambandi við frílendið niðanfyri, móti Hoydølum, er komið ynski um ein ljóðvolla, sum fer at dýrka verkætlanina nakað.

Samlaður kostnaður er mettur til kr. 1,9 mió. kr.

**Tá hetta arbeiði er gjørt, væntar bert at breiðka Eystara ringveg á teininum frá ljóskurvunum og niðan móti rundkoyringini á Hálsi.**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður framd sum skjótast og fíggjað av tøkum peningi og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 1,9 mió. av konto 6875 L00001 og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 25. oktober 2018: Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundur 29. november 2018: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið í sambandi við at breiðka Eystara ringveg og Hvítanesvegin oman til Hoydalsá hevur verið í útboði og komu tvey tilboð inn. Frank Hellisdal kann gera arbeiðið fyri kr. 2.359.400,- uttan MVG og Konsax fyri kr. 2.092.410,34 uttan mvg. Umsitingin metir, at leggjast skal upp fyri ókendum útreiðslum, projektering og byggileiðslu. Samlaði kostnaðurin verður sostatt mettur til kr. 2.450.000,- íroknað 6,25% MVG.

Áður eru játtaðar kr. 1.900.000,- til breiðkanina, sostatt mangla kr. 600.000.

Umsitingin vísir á, at væntandi játtan kann fíggjast av kt. 8175, projekt "L81017 Dagføring av Hóvabrekku", har tað standa kr. 875.000, sum ikki verða nýttar í ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:
- at tikið verður av tilboðnum frá Konsax.
- at verkætlanin verður sett í verk skjótast til ber.
- at manglandi játtan uppá kr. 600.000 verður at fíggja av kt. 8175, projekt "L81017 Dagføring av Hóvabrekku.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Tekniska nevnd 12. februar 2019: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.**

**Býráðsfundur 28. februar 2019: Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundur 14. mars 2019: Einmælt samtykt við aðru viðgerð.**

**Ískoyti:**

Arbeiðið at breiðka Eystara ringveg og Hvítanesvegin oman til Hoydalsá er í gerð og gongur væl. Tó eru 2 viðurskifti sum støða skal takast til, tað er:

1) Sambært frílendisætlanini í Hoydølum, skal ein ljóðvolli gerast fram við vegnum, hesin var upprunaliga við í ætlanini, men er tikin burtur úr ætlanini, tá sparingar eru gjørdar, áðrenn sáttmálin varð undirskrivaður.
   Umhvørvisstovan hevur gjørt vart við hetta og hevur umsitingin havt fund við Umhvørvisstovuna um málið. Partarnir vóru samdir um, at kanna eftir um tað ber til at gera eina grótlaðing á sama hátt sum á hinari síðuni av vegnum.

   *Umsitingin er í gongd við at kanna, hvat tað kemur at kosta og verður metingin løgd fram á fundinum.*

2) Konsax hava áður gjørt vart við, at tað í útbjóðingartilfarinum er roknað við alt ov lítlum nøgdum av gróti til uppfylling. Umsitingin vendi sær til ráðgevan við hesum, fyri at fáa gjørt nýggjar útrokningar og upplýsti ráðgevin, at tær nøgdir sum vóru uppgivnar í útbjóðingartilfarinum, vóru rættar.
   Nú arbeiðið er komið væl áleiðis, vísir tað seg, at tað fer nógv meira grót í enn uppgivið í útbjóðingartilfarinum. Sambært sáttmálanum skal byggiharrin gjalda fyri meira veitingar í mun til uppgivnu nøgdirnar í sáttmálanum.
   Tað eru 2 møguleikar:

   a) At játta meira fígging til arbeiðið, soleiðis at alt arbeiðið kann gerast liðugt sambært sáttmálanum.

      *Umsitingin er í gongd við at kanna eftir hvat tað kemur at kosta og verður metingin løgd fram á fundinum.*

   b) At projektið verður broytt, soleiðis at breiðkanin av Hvítanesvegnum ikki verður heilt oman til Hoydalsá, men bara nakrar metrar oman frá Eystara ringvegi.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at játtaðar verða kr. ein millión afturat til arbeiðið, av konto 6177, orku- og umhvørvistiltøk, soleiðis at arbeiðið kann gerast liðugt, íroknað grótkant oman ímóti fríøkinum, og beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. juni 2019: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019: Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 20. juni 2019: Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundur 04. juli 2019: Einmælt samtykt við aðru viðgerð.**

**Ískoyti:**
Staðfestast kann, at arbeiðið er liðugt, og at rakstrarstovnar kommununar hava yvirtikið rakstur av ljósreguleringum og ferðsluannlegginum annars. Somuleiðis kann staðfestast, at løgukontan L81030 Ljósregulering við Eystara Ringveg/Hvítanesvegin hevur eitt hall á kr. 903.000,-.

Ikki ber til í skjalatilfari ella fyrispurningum at fáa eina fulfíggjaða mynd av orsøkini til hetta hall, men úr leiðslukunningini kann staðfestast, at í mun til tær tilsamans í hesum málið játtaðu 3.900 tkr til verkætlanina

(tá tær fyrstu 200 tkr frá 2014 ikki eru íroknaðar), eru samanlagt brúktar 4.802 tkr. Hetta samsvarar júst við hallið á 903 tkr, sum er framflutt síðani 2019.

Viðmerkjast skal tó, at samlaði sáttmálin, sum Konsax framdi í 2019 var áljóðandi 2.092 tkr u/mvg, men bleiv víðkaður til 3.092 tkr við at eyka grótfylla kostaði 969 tkr afturat og geonet 31 tkr afturat. Harafturat er asfaltering fyri 495 tkr umbiðin eyka. Sostatt er sáttmálin víðkaður við 1.588 tkr v/mvg, uttan at hetta sæst aftur í hægri játtanum.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | L81030 | Ljósregulering við Eystara Ringvegur/Hvítanesvegur | | 903.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Teknisku deild mæla til, at hallið á kr. 903.000,- verður játtað av løgukarminum fyri vegaverkætlair LK81999 á løgukonto L81030, og at verkætlanin L81030 Ljósregulering við Eystara Ringvegur/Hvítanesvegur verður lokað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. apríl 2023: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.**

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt.

# 125/23 Uppskot til staðseting av einum føroyskum fongsli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2023 | 69/23 | 23/01258-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 142/23 | 23/01258-4 |
| 3 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 125/23 | 23/01258-4 |

**Upprunin til málið**
Føroya landsstýri og danska stjórnin hava skrivað undir eina ætlanaryvirlýsing um at seta ferð á tilgongdina at byggja eitt fongsul í Føroyum. Løgmálaráðið heitir tí á allar kommunurnar í landinum um at koma við uppskotum til staðseting av nýggjum føroyskum fongsli.

**Lýsing av málinum**
Nýggja fongslið skal loysa varðhaldið í Mjørkadali av. Í varðhaldinum í Mjørkadali sita sum meginregla bara persónar, sum hava ein fongsulsdóm, ið er styttri enn 18 mánaðir. Aðrir persónar mugu sum meginregla til Danmarkar fyri at sita dómin.

Við nýggja fongslinum kann væntast, at so at siga allir føroyingar, ið verða dømdir fongsulsrevsing, kunna sita revsingina í Føroyum. Hetta kann hava stóran týdning fyri endurmenningina av tí dømda, tí nógv bendir á, at tað hevur ringa ávirkan á tey føroysku innsettu at verða send til Danmarkar, har tey í nógvum førum koma í samband við eitt nógv ráari kriminelt umhvørvi.

Yvirskipað kann fongsulsverkætlanin væntast at verða framd í hesum stigum:
- Í árunum 2023 og 2024 verður byggiverkætlanin løgd til rættis ella prosjekterað.
- Í árunum 2025 og 2026 verður grundøkið útvegað og gjørt byggibúgvið.
- Og í árunum 2027-2030 verður nýggja fongslið bygt.

Fyrsta stigið í verkætlanini er tó, at danska stjórnin og Føroya landsstýrið koma ásamt um staðsetingina av nýggja fongslinum.
Danska kriminalforsorgin hevur gjørt eina kravfesting, og leggur fyribils skitsuuppskotið í greiningini upp til eina bygging áljóðandi 3200m$^2$, ikki íroknað víðkanarmøguleikar. Út frá neyðugu trygdarkrøvunum við einum uttara geira (ein múrur + eitt perimeturhegn ella trý perimeturhegn) verður mett, at økið i minsta lagi skal vera 40.000m$^2$ (4 hektar) til støddar. Skapið og skipanin av byggingini saman við ítøkiliga økinum, og hvussu lendið háttar seg, kann hava við sær, at tørvur gerst á einum størri øki upp ímóti 80.000m$^2$ (8 hektar).

Fleiri ítøkilig krøv eru til staðsetingina, harímillum verður ynskt, at økið liggur tætt upp at bygdum øki og verandi infrakervi og er innan fyri eina rímiliga fjarstøðu frá Havnini. Gott busssamband verður ynskt til starvsfólk og vitjandi, eins og økið kann gerast partur av einum nærumhvørvi tó soleiðis háttað, at økið kann verða avbyrgt og virka ótarnað í mun til virksemið. Sí annars nágreinaðu krøvini í kravfestingini *Kravfesting (notat) - Kriminalforsorgen.*

Arresthús varð bygt í Havn í 1967, og var hetta í nýtslu, til virksemið varð flutt niðan í Mjørkadal sum ein fyribils loysn í 2011. Søguliga sæð hevur fongslið tí verið ein partur av býarmyndini í høvuðsstaðnum eins og ein sjónligur liður og skylda í samfelagnum, sum umframt at hava tænt endamálinum um varðhald eisini hevur skapt arbeiðspláss í kommununi.

Umsitingin hevur í sambandi við áheitanina hugt eftir møguligum økjum í Tórshavnar kommunu, ið lúka treytirnar í kravfestingini. Víst verður á fimm øki og raðfestar møguleikar, ið øll lúka minsta kravið til stødd á øki, eins og økini kunnu víðkast upp til 80.000m$^2$, um tørvur gerst á einum størri øki. Raðfestu økini eru

lýst í skjalinum *Føroyskt fongsul - Raðfestingarskjal* og kortskjalinum *Uppskot til staðsetingar til nýtt fongsul* við vegleiðandi skapi og støddum og eru:

1. Tyrvingarplássið
2. Velbastaður I
3. Velbastaður II
4. Glyvursnes
5. Inni á Gøtu II

Tørvur er á einum stórum øki, og er eyðsætt tí at bøta um verandi sár í lendinum, eisini havandi í huga, at avmarkað byggilendi er í Tórshavnar kommunu. Fýra út av fimm staðsetingum leggja tí upp til at gagnnýta og fríðka um verandi ávirkaði landsløg.

Felags fyri allar staðsetingarnar er, at økini eru tætt upp at bygdum økjum og Havnini, tó eisini avbyrgd sum lýst í kravfestingini í mun til ætlaða virksemið. Gott útsýni er frá øllum staðsetingunum, sum tí eisini liggja nakað ábært í mun til føroyska veðurlagið / veður og vind. Økini eru umgird av vakrari náttúru, sum tí øll stuðla undir góðum fríðtíðar-/útilívi.

Fíggjarligar avleiðingar kunnu verða í sambandi við tekniskar leiðingar og at knýta í verandi infrakervið, eins og talan er um festarajørð í øllum fimm staðsetingunum. Á øllum økjunum kann gerast talan um bygging og virksemi, sum gerst sjónligt í býarmyndini, bæði tá hugsað verður um skipan av bygging, sniðgeving eins og ítøkiligu staðsetingarnar í mun til bygda økið, og sum portalar inn til høvuðsstaðin. Tórshavnar kommuna kann tí vísa Føroya landsstýri á økir við ásettum treytum til bygging og útsjónd.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Allar staðsetingarnar eru festijørð, tískil verður neyðugt við eini avgreiðslu av ognarviðurskiftunum við Búnaðarstovuna í eini framhaldandi tilgongd, um Løgmálaráðið ynskir at fara í samráðingar um eina av omanfyrinevndu staðsetingum.

Á Velbastað er avtala millum Tunnilsfelagið og Tórshavnar kommunu um tyrving av gróti.

Á Glyvursnesi er avtala millum Tórshavnar Havn og Tórshavnar kommunu um virksemið í grótbrotinum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Samskifti hevur verið við Amnesty Føroyar, ið vísa til nøkur av somu krøvunum, sum lýst eru í kravfestingini frá donsku kriminalforsorgini. Nágreiniliga verður heitt á kommununa um at taka atlit til, at staðsetingin ikki ger seg inn á minstu standardirnar hjá ST um fongsling, tað er eitt nú:

- at staðsetingin ger tað møguligt hjá innsettum at hava ítriv, arbeiði, at fáa undirvísing og at røra seg.
- at staðsetingin ikki forðar fyri ella ger tað torført hjá innsettum at fáa vitjan.
- at staðsetingin ikki forðar fyri góðari og tryggari atkomu til fongslið. Um ringt veður er, skal tað vera gjørligt at koma til og fara frá fongslinum t.d. í læknaørindum, um eitt óhapp hendir, ella tørvur er á bráðfangishjálp.

Harafturat verður eisini sagt, at tað at verða sendur av landinum fyri at sita revsingina, í veruleikanum er eitt slag av dupultari revsing, sum ikki sampakkar serliga væl við til dømis Evropeiska mannarættindasáttmálan.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Skipan av Stórutjørn, journal nr. 18/03468.
Golfvøllur á Glyvursnesi - byggiverkætlan, journal nr. 19/04397.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Samskifti er við umhvørvisdeildina viðvíkjandi arbeiðinum at avrigga tyrvingarplássið. Arbeiðið er komið væl ávegis, og verður mett, at væl ber til at byggja á økinum, tá økið er liðugt tyrvt. Kanningar eru gjørdar

(umhvørvisfrágreiðing 2023) av sevju frá dálkaða virkseminum, og er harumframt staðfest, at ongin dampur er frá virkseminum í økinum.

**Skjøl**
Kort - uppskot til staðseting, journal nr. 23/01258-5.
Kravfesting (notat) - Kriminalforsorgen, journal nr. 23/01258-6.
Føroyskt fongsul - Raðfestingarskjal, journal nr. 23/01258-7.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umrøða spurningin, um nýtt føroyskt fongsul skal staðsetast í Tórshavnar kommunu, at raðfesta staðsetingarnar at senda sum uppskot til Føroya landsstýri, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at raðfesta tyrvingarplássið sum nr. 1 og er sinnað, um neyðugt, at samráðast um aðrar staðsetingar.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og broyta heiti á staðsetingini til Húsahaga.

Annika Olsen varð ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt.

# 126/23 Útstykking oman fyri Argjahamar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2021 | 102/21 | 21/01777-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 115/21 | 21/01777-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 162/21 | 21/01777-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 180/21 | 21/01777-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 143/21 | 21/01777-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 52/21 | 21/01777-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 216/21 | 21/01777-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 224/21 | 21/01777-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 22/22 | 21/01777-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.03.2022 | 76/22 | 21/01777-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.03.2022 | 93/22 | 21/01777-1 |
| 12 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 61/22 | 21/01777-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 88/22 | 21/01777-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.08.2022 | 155/22 | 21/01777-1 |
| 15 Tekniska nevnd | 08.08.2022 | 51/22 | 21/01777-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 08.08.2022 | 193/22 | 21/01777-1 |
| 17 Býráðsfundur | 09.08.2022 | 174/22 | 21/01777-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2022 | 213/22 | 21/01777-1 |
| 19 Tekniska nevnd | 07.11.2022 | 72/22 | 21/01777-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.01.2023 | 9/23 | 21/01777-1 |
| 21 Tekniska nevnd | 24.01.2023 | 2/23 | 21/01777-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 26.01.2023 | 28/23 | 21/01777-1 |
| 23 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 26/23 | 21/01777-1 |
| 24 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.05.2023 | 71/23 | 21/01777-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 25.05.2023 | 157/23 | 21/01777-1 |
| 26 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 126/23 | 21/01777-1 |

**Upprunin til málið**
Stóri bústaðartørvurin í Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Tórshavn eins og aðrir høvuðsstaðir er í teirri støðu, at tey flestu vilja búgva her. Sum høvuðsstaðarkommuna mugu vit ganga á odda til tess at finna loysnir á bústaðarøkinum. Í hesari tilgongd vilja vit skapa eina burðardygga býarmenning, har rúm er fyri øllum, har vit tætta býin og har vit gagnnýta býin skynsamari. Harumframt er tað týdningarmikið, at vit sum kommuna standa á odda fyri at veita fjølbroyttar bústaðir, bæði eigara- og leigubústaðir.

Stórur fólkavøkstur er, umframt at húskini minka alsamt. Kommunuætlanin frá 2020 vísir á, at tørvur verður á íalt 10200 bústøðum í 2032 roknað frá 2018.

Tískil er tað týdningarmikið, at kommunan eisini sjálv stendur á odda fyri at veita borgarum bústaðir, samstundis sum hon samstarvar við virkandi innan privatu vinnuna um partar av hesi uppgávuni.

Bústaðarsløgini eru vanliga býtt upp í sethús, tvíhús/raðhús og íbúðir. Tað eru nógv sum ynskja at búgva í sethúsum, umframt at vit síggja ein størri og størri áhuga fyri íbúðum. Enn manglar kommunan eitt útboð av leigubústøðum, meðan vit hava seinastu árini havt nógvar útstykkingar við íbúðum.

Kommunuætlanin vísir á ymisk lendi til býarvøkstur, har Stóratjørn stendur at verða best egnaða lendið til býarvøkstur og økið Klingurstjørn er næstbesta staðseting. Arbeitt verður við ætlanunum á Stórutjørn, og er ætlanin nú at fara í gongd við eina ætlan oman fyri Argjahamri, sí kortskjal nr. 21/01777-3, Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri.

Viðlagda kortskjal er ein skitsa av hvussu økið kann verða skipað við bústøðum, bæði set- , raðhúsum og íbúðum, umframt at øki verður lagt av til møguliga stovnsbygging. Neyðugt verður at umsitingin tillagar uppskotið, soleiðis at skipanin av økinum verður nøktandi, umframt at hetta kortskjalið er ikki heilt í samsvar við tað, sum er avtalað við festaran á økinum. Ymisku byggistigini síðani skulu projekterast.

Lendið, matr. nr. 4a, sum ætlanin er at fara undir at skipa til bústaðarbygging og stovnsbygging, er ogn hjá Búnaðarstovuni, har Poul Müller er festari á lendinum. Samlaða økisvíddin, sum er avtalað við festaran at fara undir at skipa sæst á kortskjalinum nr. 21/01777-6, Lendi at keypa frá Búnaðarstovuni til nýggja útstykking, er sambært kortskjalinum uml. 128.000 fermetrar til støddar.
Uppskot til ætlanaravtalu við festaran er gjørd og viðheft, sí skjal nr. 21/01777-4, Uppskot til ætlanaravtalu millum Tórshavnar kommunu og Poul Müller.

Ætlanaravtalan fevnir bæði um lendið til útstykking, umframt lendið til Viðarlund, matr. nr. 4a og matr. nr. 43a, sí kortskjal nr. 21/01777-5, Argjahamri_Viðarlund.

Samanlagt er talan um áleið 163.000 $m^2$, ið Tórshavnar kommuna skal keypa og frábýta frá Búnaðarstovuni til ætlaðu útstykkingar- og frílendisendamál.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lóg um landsjørð

**Upplýsingar frá umsitingini**
Støða skal takast til, hvat slag av bústøðum økið skal skipast til, hvussu stór grundstykkini skulu vera og hvussu fríøkini í útstykkingini verða skipaði og tryggjaði. Harumframt er týdningarmikið, at útstykkingin í størstan mun tillagar seg lendið og at eitt nú leiðin niðan á Kongavarða verður varðveitt.
Ein umhvørvis árinismeting eigur at verða gjørd av lendinum, áðrenn farið verður undir at skipa tað endaligt, soleiðis at atlit kunnu verða tikin til serlig viðurskiftir í økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
21/01777-3, Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri
21/01777-4, Uppskot til ætlanaravtalu millum Tórshavnar kommunu og Poul Müller
21/01777-5, Argjahamri_Viðarlund
21/01777-6, Lendi at keypa frá Búnaðarstovuni til nýggja útstykking

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- At lendið, sambært kortskjali 21/01777-6, verður lagt av til nýggja útstykking í kommununi, og at umsitingin fer undir at skipa økið neyvari.
- At heimila umsitingini at bjóða projekteringina út.
- At ætlanaravtalan, skjal nr. 21/01777-4, verður samtykt.
- At heimila umsitingini at søkja Búnaðarstovuna um at keypa lendið sambært kortskjali 21/01777-5 og 21/01777-6.
- At málið verður beint aftur í nevnd, tá samlaði lendiskostnaðurin er kendur.
- Og at beina málið í fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið tilsøgn frá Búnaðarstovuni um keyp av lendi til ætlaðu útstykkingina á Argjahamri. Umsóknin hevur verið til ummælis hjá festaranum, sum ikki hevur viðmerkingar til ætlanirnar hjá kommununi. Kommunan skal rinda umleið 15 mió. kr. fyri at ogna sær lendið v.m., og kemur hesin peningur heilt ella lutvíst inn aftur, tá ið grundøkini í útstykkingini verða seld. Mælt verður til at fíggja keypið av tøkum peningi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at játta kr. 15 mió. av tøkum peningi til keyp av lendi til nýggja útstykking omanfyri Argjahamar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Í tilsøgn dagfest 16. juni 2021 hevur Búnaðarstovan útgreinað samlaða kostnaðin, ið Tórshavnar kommuna skal rinda fyri útvegan av lendi til ætlaðu útstykkingina omanfyri Argjahamar. Samlaðu útreiðslurnar fyri kommununa verða umleið 13 mió. kr., ið mælt verður til at játtað av tøkum peningi.
**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tá Tórshavnar kommuna hevur fingið til vega lendið oman fyri Argjahamar og Klingurstjørn, og lendið sunnan fyri verandi útstykking á Hamrinum, er neyðugt við eini tilgongd at fyrireika økið til byggibúning.

Lendið oman fyri Argjahamar og Klingurstjørn og lendið uttan fyri Argjahamar er soleiðis háttað, at tað er av størsta týdningi, at greiða fyrst fæst á, hvussu infrakervið í økinum verður skipað fyri á optimalan hátt at knýta saman byggilendi. Eisini er neyðugt út frá hesum at gera skipanaruppskot fyri byggingina, grøn øki, parkering o.s.fr. Til hetta krevst ein projektering av vegum, leiðingum og møguligum byggiøkjum í 3D.

Mett verður, at hetta projekteringsarbeiðið til skipanaruppskot í fyrstu syftu kann gerast av uttanhýsis ráðgeva innan fyri eina rammuupphædd á kr. 200.000,-. Málið verður lagt aftur fyri nevnd, tá innleiðandi projekteringsarbeiðið er komið á mál uml. einar 4 vikur eftir at peingurin er játtaður.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin, og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 200.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir á nýggja verkætlan, "Útstykking oman fyri Argjahamar" undir kt. 6475, Byggibúning bústaðir, og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og bárskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri broyting, at peningurin verður játtaður av kto 6475 og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjekteringsarbeiði til skipanaruppskot er framt og handað umsitingini. Arbeitt verður fram ímóti, at gera útboðstilfar, at bjóða arbeiðið út eftir. Til hetta arbeiðið og onnur arbeiðir í sambandi við fyrireikingar av útstykkingini verður mett, at tørvur er á upp til kr. 2.000.000,- í 2022.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtað verður kr. 2.000.000,- á verkætlan L64019 Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475 Byggibúning bústaðir, at fremja fyrireikingararbeiði til at seta útstykkingararbeiðið í gongd. Hetta verður fíggjað av keyp og sølu.
**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tá tað í heyst varð farið undir at skipa útstykkingina oman fyri Argjahamar, tá var hægsta raðfestingin at fáa lagt vegin so skynsamt sum gjørligt í lendið, fyri síðani at planleggja ítøkiligu bygginina á staðnum. Yvirskipaða skipanin av økinum er nú liðug og sæst á hjálagda skjali "*Uppskot_Útstykkingar oman fyri Argjahamar_Støðumynd*" j.nr. 21/01777-30.
Hendan skipanin, í mun til hvørji bústaðarsløg í síðsta enda fara at verða loyvd í økinum, kann broytast í tilgongdini, men er ætlanin at fyrihalda seg í størstan mun til hesa skipanina.

Sum omanfyri greitt frá, so hevur tað alla tíðina verið týdningarmikið at fáa lagt vegin rætt, og er fyrsta strekkið av vegnum nú liðugt projekterað og klárt at bjóða út. Talan er um vegastrekkið frá rundkoyringini á Argjahamri og út til vegin hjá festaranum, sum leiðir allan vegin út í grótbrotið á Glyvursnesi. Hetta strekkið, sum verður boðið út, er uml. 600 m.

Til hetta ítøkiliga vegastrekkið, sum verður ein sambindingarvegur í útstykkingini, knýta so hinir vegirnir seg í, og útfrá teimum verða so áleið 200 bústaðir og barnagarðurin knýttir í.

Ætlanin er, at hetta ítøkiliga vegastrekkið verður fíggjað av komandi bústøðum og barnagarðinum. Hetta er líknandi tilgongd, sum vit kenna frá eitt nú Løgmannabreyt og Karlamagnusarbreyt.

Ætlanin er at fara undir framhaldandi projekteringina av útstykkingini beinanvegin, soleiðis at tá sambindingarvegurin, sum nú fer í útboð, er liðugt bygdur, so er klárt at fara undir írestandi vegir og fyri síðani at bjóða økir til bústaðarbygging út.

Til hesir arbeiðir verður mettur ein fíggjarligur tørvur á kr. 6 mió. har uml. 4 mió. kr. fara til bygging av sambindingarvegnum og 2 mió. kr. fara til framhaldandi planlegging og projektering av útstykkingini.

Ætlanin er at játta peningin av tøkum peningi, sum krevur tvær viðgerðir í býráðnum. Til aðru viðgerð í býráðnum er ætlanin at koma við eini nærri lýsing av málinum, har ein ítøkilig tíðarætlan, kostnaðarætlan og søluætlan fyriliggja.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

- At heimila umsitingini at bjóða sambindingarvegin út og at gera sáttmála við vinnandi arbeiðstakaran.
- At heimila umsitingini at halda fram við projekteringini av útstykkingini.
- At játta kr. 2.000.000,- á verkætlan L64019 Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475 Byggibúning bústaðir, fíggjað av tøkum peningi.
- At játta kr. 4.000.000,- á verkætlan L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475 Byggibúning bústaðir, fíggjað av tøkum peningi.
- Verkætlanin verður eftir ætlan fíggjað við inntøku frá sølu av grundstykkjum til bústaðir og barnagarð innanfyri umleið 1 ár.
  At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 23. mars 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.
**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**:
LBF P/f hevur vegna Tórshavnar kommunu prosjekterað útstykkingina og boðið útstykkingararbeiðið út til tríggjar arbeiðstakarar.

Hesi tilboð komu inn:

| | |
|---|---|
| MT Højgaard Føroya P/f: | kr. 44.288.470,- |
| J&K Petersen P/f: | kr. 58.895.479,- |
| Articon P/f: | kr. 57.236.594,- |

Við støði í tilboðnum frá MT Højgaard Føroyar og fyrireikandi arbeiðum, sum longu eru í gerð, hevur umsiting kommununar latið gera eina samlaða kostnaðarmeting, har útreiðslur fyri prosjektering, útboð, byggileiðslu, fakeftirlit, byggiharraveitingar, umsiting, tryggingar og MVG v.m. eru íroknað.

Um tikið verður av lægsta tilboðnum, sum er frá MT Højgaard Føroya P/f, metir umsitingin at samlaða útstykkingararbeiðið kann gerast fyri tilsamans kr. 62.213.000,- sambært samlaðu kostnaðarmetingini (sí j.nr. 21/01777-51). Í samband við útstykkingar av hesi støddini vísa royndirnar, at neyðugt er við tøkupeningi til avleidd arbeiðir, sum falla uttan fyri arbeiðstøkuna og vísa seg, aftaná at arbeiðið er handað, og eru neyðug fyri útstykkingina. Mett verður, at leggjast skulu til síðis kr. 4.000.000,- sum ikki gerast tøkar fyrr enn arbeiðið, at gera útstykkingina er handað kommununi. Samlaði kostnaðurin fyri útstykkingina er sostatt kr. 66.213.000,- íroknað arbeiðið, sum longu er í gongd at gera arbeiðsveg á økinum.

Afturat hesum kostnaðum kemur kostnaðurin fyri lendið, sum er fingið til vega á uml. kr. 13.000.000,- Hetta gevur ein samlaðan kostnað á kr. 79.213.000,-

Av 129.280 m², sum eru keyptir til verkætlanina, verða 37.610 m² nýttir til grundstykkir til sethús, raðhús og íbúðir. Við atliti til, at tørvurin á íbúðum ikki er eins stórur og hann áður hevur verið, meðan tørvurin á raðhúsum o.l. ikki í sama mun er nøktaður, eru stykkini, sum vóru ætlað til íbúðarbygningar broytt til raðhús. Her er nú talan um 42 sethúsaeindir, 98 raðhúsaeindir og 10 íbúðareindir, í alt 150 búeindir (sí j.nr. 21/01777-47). Henda broytingin viðførir kortini, at samlaða potentiella mesta nýtsluvíddin økist við 1490 m².

Planeraðu og byggibúnaðu stykkini verða sett til sølu, so hvørt sum arbeiðið at byggibúna fer í gongd, og fíggjar henda sølan kostnaðin av útstykkingini. Tað finnast fleiri hættir at seta prís á økini, har tann mest einfaldi hátturin er at býta kostnaðin av útstykkingini út á keypta fermetratalið. Tá verður kostnaðurin við

verandi kostnaðarætlan kr. 2.106,17 fyri fermeturin (sí j.nr. 21/01777-50) Ein annar háttur kann vera, at gjaldið fyri hvørt stykki samsvarar við nettonýtsluna á stykkinum. Tað vil siga, at kostnaðurin á einum stykki verður lutfallið av mest loyvdu bygging á stykkinum býtt við mest loyvdu bygging á allari útstykkingini, faldað við kostnaðinum av allari útstykkingini. Fyrri hátturin tekur atlit til javnt býti av kostnaðinum fyri at gera hvønn fermetur byggibúnan, meðan seinni hátturin tekur atlit til javnt býti í mun til, hvussu nógv kann byggjast á hvørt stykki. Áðrenn kostnaðirnir fyri seinna útrokningarháttin verða ásettir, er neyðugt, at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið, sum staðfestir nýtslustigini í ymisku pørtunum av útstykkingini.

Av tí at tøkur peningur á játtanini til útstykkingina er 6.200.000,- er fíggjartørvurin áljóðandi kr. 60.012.377,- til at gera útstykkingina lidna.

J.nr 21/01777-48 vísir yvirlit yvir ætlaðu likviditetsgongdina fyri verkætlanina saman við grovari tíðarætlan.

Hjáløgd skjøl til hetta ískoyti:
21/01777-47
21/01777-48
21/01777-50
21/01777-51

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini, at gera sáttmála við MT Højgaard Føroyar um verkseting av útstykkingararbeiðinum við støði í tilboði teirra og at játta útlegg fyri arbeiðið fram til sølu av grundøkjum í 2024.

Tøka játtanin til ústykkingararbeiðið á konto L64018 Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475, Byggibúning bústaðir (íløgur), er kr. 6.200.000,-.

Við støði í samlaðu kostnaðarmeting mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin til, at játtað verður írestandi upphæddin á kr. 60.012.000,- til útstykkingararbeiðið, fíggjað av tøkum peningi á konto L64018 Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475, Byggibúning bústaðir (íløgur) av tøkum peningi, sum aftur verður fíggjað av sølu av grundstykkjum, og at málið verður beint víðari í Býráðið til aðru viðgerð umvegis Teknisku nevnd og Fíggjarnevndina.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Tekniska nevnd 08. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 08. august 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 09. august 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**
Íbúgvar á Viðargøtu í verandi útstykking á Hamrinum á Argjum hava mótmælt, at raðhús verða bygd millum framhaldið av Glyvursvegnum og verandi raðhús í ovara borðinum av Viðargøtu. Víst verður á, at íbúgvarnir hava fingið lyfti um, at einki skuldi byggjast í hesum økinum, og at økið skuldi liggja sum grønt øki sambært tekning av økinum á heimasíðu kommununar 21. juni 2021. Hetta eru lyftir, sum íbúgvarnir siga seg hava fingið frá umboðum fyri umsitingina í kommununi og ávísum politikarum eisini.

Umsitingin kann kortini ikki kenna aftur hesi lyfti, og eru tey ikki skrásett í nøkrum samskifti millum partarnar. Tekningin, sum víst verður til, er ikki mynd fyri endaliga skipan av økinum, men heldur partur av tilgongdini at skipa økið.

Um sami leistur fyri umrøddu raðhús verður brúktur, sum fyri raðhúsini á niðara partinum av Viðargøtu, so verða tað um 13 metrar frá raðhúsunum á Viðargøtu til niðaru øksl av vegnum inn til nýggju raðhúsini, vegurin verður 8 m breiður, og síðani verða uml 10,5 m frá ovaru øksl til nýggju raðhúsini (sí skjal 21/01777-47 “Uppskot til organisering av útstykking juni 2022.pdf”). Hetta er í alt uml. 31 m millum gomlu raðhúsini og tey nýggju. Ovara síða av nýggju raðhúsunum kemur at vera umleið 10,5 m frá økslini av framhaldinum av Glyvursvegnum, og verður hæddarmunurin ikki eins stórur, og hann er millum gamla vegin út á

Glyvursnes og verandi raðhús. Verður hesin leistur brúktur, er rúm fyri 16 raðhúsum í hesum økinum. Hetta er uml 7-8 % av samlaða ætlaða talinum av búeindum í útstykkingini.

Umrødda økið, sum íbúgvarnir mótmæla, at bygt verður á, er tað økið, sum er skjótast at gera byggibúgvið, og tað sum tí fyrst kann veita kommununi fleiri bústaðir í hesi útstykkingini. Útstykkingin skal í aðrar mátar lúka treytirnar fyri fríøki, spæliplássum og grønum økjum, sum eru ásettar í byggisamtyktini. Tí verður ikki mett, at tað er alneyðugt, at júst hetta økið verur brúkt til fríøki.

Hóast umsitingin skilir ynskið frá íbúgvunum á Hamrinum um, at umrødda økið verður lagt út sum fríøkið, og gamli vegurin brúktur sum gonguleið, so verður mett, at tørvurin á bústøðum gongur fram um hesi ynski, tá grøn øki og frílendi kunnu og verða løgd av aðrastaðni í útstykkingarøkinum.

**Skjøl**
22/05464-1 Mótmælisskriv frá íbúgvum í Viðargøtu um bygging á Argjahamri

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin tekur undir við, at økið millum framhaldið av Glyvursvegnum og raðhúsini á Viðargøtu ikki verður lagt av til frílendi, grønt øki ella spælipláss burtur av, men framhaldandi kann vera partur av skipanararbeiðinum fyri útstykkingina omanfyri Argjahamar, herundir eisini sum bústaðarøki.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2022:** Tikið av skrá.
**Tekniska nevnd 07. november 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**

<u>Stutt um yvirskipaðu ætlanina</u>
Økið, sum verður stykkjað út, leggur seg uppat býlinginum uppi á Argjahamri, skúlanum á Argjahamri og dagstovninum á Argjahamri, sum verður útbygdur suðureftir.
Í yvirskipaðu útstykkingarætlanini verður pláss fyri áleið 190 búeindum umframt bygging til stovn og miðstaðarvirksemi. Endaliga talið av búeindum avhongur nakað av, hvussu økini í tilgongdini verða ment saman við keyparunum.

Miðað hevur verið ímóti at skipa útstykkingina út frá verandi grannalagi, sum er samansett við sethúsum og raðhúsum. Sostatt hevur tað verið ynskiligt, at komandi bygging í økinum fær nakað líknandi dám.

Talan er um blandaða bygging, har eitt øki er lagt av til handil/tænastuvirksemi, umframt 82 raðhús, av teimum kunnu 37 eisini innrættast við 2 íbúðum. Harumframt er útstykkingin í sunnara endanum skipað við áleið 46 sethúsum, einum grundøki til bústovn framvið høvuðsvegnum og einum øki til bygging av bygningi til miðstaðaendamál við áleið 22 íbúðum í ovaru hæddunum.

Sí samlaðu útstykkingina á viðhefta skjali, j.nr. 21/01777-69, Verkætlanarlýsing útstykking omanfyri Argjahamar.

Vegirnir, ið knýta økið saman, eru 6 í tali. Í skjalinum, verða teir lýstir sum «Linja 1-6»

Ein nýggjur Glyvursvegur (Linja 1) við súkklubreytum verður høvuðsvegurin í ætlanini og verður knýttur í rundkoyringina á Argjahamri, har møguleiki verður at leingja hann seinni til fleiri útstykkingar suðureftir ímóti Glyvursnesi.
Allir vegirnir í ætlanini knýta seg í nýggja Glyvursvegin, uttan «Linja 6», sum verður knýtt í Rygsgøtu.

Gamli Glyvursvegurin (Linja 3) verður gjørdur um til ein blindveg við innkoyring úr erva frá nýggja Glyvursvegnum.

Yvirskipaða útstykkingarætlanin er skipað í byggiøkir, sum verða deild upp og lýst leys at keypa so við og við sum tey gerast søluklár. Sí mál «Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging, journal nr. 22/07223».

Í tilgongdini hava íbúgvar í Viðargøtu gjørt vart við sína ónøgd, í sambandi við at ætlanin er at byggja framvið linju 3 – øki 1. Íbúgvarnir hava víst á, at tey ikki ynskja at hesi raðhúsini verða bygd. Tey ynskja, at økið verður brúkt til fríøki. Umsitingin skilur væl ynski hjá íbúgvunum, men vísir eisini á, at tað er stór bústaðarneyð í kommununi, og tilskil er tørvur á at nýta tey lendi, sum eru lætt atkomulig og lætt byggibar.

Upprunaliga var ætlanin at byggja 16 raðhús framvið vegnum í ovara borð, men talið er lækkað niður í 11 raðhús í tilgongdini. Umsitingin hevur kannað eftir, hvussu hesi raðhúsini í minst møguligan mun koma at ávirka verandi grannar í økinum, og tí er ætlanin at hesi raðhúsini einans verða bygd í tveimum hæddum. Kanningarnar vístu, at við einans at byggja í tveimum hæddum, umframt at gera ein lítlan volla framvið vegnum í niðara borð, so minka árinini av innliti til grannarnar heilt nógv. Harumframt hevur umsitingin kannað, hvussu byggingin kemur at ávirka grannarnar í mun til sól- og skuggaviðurskifti. Sí skjøl, sum vísa hetta, j.nr. 21/01777-68, Innlit til grannar á Viðargøtu og j. nr. 21/01777-68, skuggadiagram raðhús.

<u>Stutt um prosjekteringina</u>
6. apríl í 2022 gjørdi Tórshavnar kommuna avtalu við P/f LBF um prosjekteringina av vegum og útstykking í sambandi við útstykkingina omanfyri Argjahamar, sí j. nr. 21/01777-42.

Ráðgevaraavtalan umfataði:
1. Prosjekteringina av liðuggerð av høvuðsvegunum (framhald av Glyvursvegnum),
2. Prosjektering av vegi, byggibúning, planeringum og leiðingum í sambandi við vegin vestureftir frá framhaldinum av Glyvurvegnum
3. Prosjektering av vegi, byggibúning, planeringum og leiðingum oman fyri verandi Viðagøtu.
4. Prosjektering av spreinging og grovplanering til økini sunnan fyri verandi útstykking á Hamrinum, til at virka sum stuttflutt tilfarsgoymsla.
5. Veitingar í sambandi við hesi arbeiði.

Klárt er nú at víðka hesa ráðgevara-avtaluna við P/f LBF um liðuggerð av økinum sunnan fyri verandi Argjahamar (Sethúsaútstykkingin – øki 2). Eisini má takast við í hesa avtalu at prosjekterað verður í mun til ymiskar íkomnar broytingar, ið eru gjørdar í mun til skipanina av økinum.

Hetta vóru lutir, sum ikki vóru umfataðir av upprunaliga ráðgevarasáttmálanum. Sáttmáli skal gerast við ráðgevan um, at prosjektera verður soleiðis, at arbeiðið kann bjóðast út og fremjast

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Útstykking omanfyri Argjahamar, matr.nr. 256, Kirkjubøur,* journal nr. 22/07317.
- *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging,* journal nr. 22/07223.

**Hjáløgd skjøl:**
j.nr. 21/01777-42, Ráðgevaraavtala um Høvuðsprojekt Oman Argjahamar
j.nr. 21/01777-68, Innlit til grannar á Viðargøtu
j.nr. 21/01777-68, skuggadiagram raðhús
j.nr. 21/01777-69, Verkætlanarlýsing útstykking omanfyri Argjahamar

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
- taka undir við skipanini av útstykkingini
- heimila umsitingini at gera avtalu um liðugtprosjektering
- játta kr. 452.000 av verandi játtan á kt. L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar til prosjektering

beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd
**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at møgulig framtíðar útbygging av Skúlanum á Argjahamri verður við einari hædd omaná.
**Tekniska nevnd 24. januar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.
**Fíggjarnevndin 26. januar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sáttmálin við MT Højgaard Føroyar P/F at gera útstykking oman fyri Argjahamar inniheldur liðuggerð av Glyvursvegnum, vegi 2 og 3, og planeringunum á økjunum 1, 3, 5, 6 og 7 (Vegir og øki omanfyri útstykkingina á Klingurstjørn og Hamaran). Fyri veg 4, 5 og 6 verður spreinging og grovplanering av økinum til vegir og sethúsabygging framd (hetta er øki niðanfyri Glyvursveg í forleingilsi av verandi útstykking á Hamrinum). Nú komið er so mikið langt við arbeiðinum, er kostnaðurin eisini ásettur fyri liðuggerð av hesum sethúsaøkinum við tilhoyrandi vegum. Talan er um eina samlaða upphædd á kr. 17.750.000,- íroknað kommunalt mvg, óvæntað og byggiharraútreiðslur. Við hesum kostnaðinum kemur samlaði kostnaðurin av útstykkingini at verða kr. 96.267.600,- íroknað mvg.

Í útstykkingini verða upp til 204 búeindir, umframt miðstaðarøki til handil og tænastu og eitt øki, sum verður ætlað almannaverkinum til stovn/stovnar.

Økið verður selt, sum áður umrøtt, við støði í nýtsluvíddini av stykkjunum. Sølan verður framd við heimild í býráðssamtykt í máli 22/07233 «Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging» frá 26. januar 2023.

Her verður sølukostnaðurin býttur soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Øki til stovn/stovnar hjá Almannaverkinum (9.250 m² á 400 kr.): | kr. | 3.700.000 |
| Øki til miðstaðarøki (6.578 m² á 900 kr.): | kr. | 5.920.200 |
| Øki 1 til raðhús (11 stk á 343 m² á kr. 618.853. Nýstlustig 0,7): | kr. | 6.807.382 |
| Øki 2 til sethús (46 stk á 400 m² á kr. 618.853. Nýtslustig 0,6): | kr. | 28.467.234 |
| Øki 3 til íbúðir (11 stk á 343 m² á kr. 618.853. Nýstlustig 0,7): | kr. | 6.807.382 |
| Øki 5 til íbúðir (20 stk á 343 m² á kr. 618.853. Nýstlustig 0,7): | kr. | 12.377.058 |
| Øki 5.1 til raðhús (10 stk á 313 m² á kr. 564.703. Nýtslustig 0,7): | kr. | 5.647.033 |
| Øki 5.2 til raðhús (16 stk á 313 m² á kr. 564.703. Nýtslustig 0,7): | kr. | 9.035.252 |
| Øki 6 til íbúðir (6 stk á 313 m² á kr. 564.703. Nýtslustig 0,7): | kr. | 3.388.220 |
| Øki 6.1 til raðhús (8 stk á 313 m² á kr. 564.703. Nýtslustig 0,7): | kr. | 4.517.626 |
| Øki 7 til raðhús (17 stk á 313 m² á kr. 564.703. Nýtslustig 0,7): | kr. | 9.599.956 |

Av hesum økjum ber til í øki 3 at gera upp til 33 íbúðir, í øki 5 upp til 40 íbúðir og øki 6 upp til 12 íbúðir.

**Onnur mál, ið hava týdning:**
22/07233 «Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging»

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |

| **Upphædd** |
|---|

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6475 | LK64019 | Útstykking omanfyri Argjahamar | 6475 | L64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar | | | 17.750.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 96.962 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:
- at játtaðar verða kr. 17.750.000,- av LK64019, Útstykking omanfyri Argjahamar, til liðuggerð av verkætlanini L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar, deild 6475 Byggibúning bústaðir (íløgur).
- at játtanin verður fíggjað við inntøku frá sølu av grundstykkjum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heimila umsitingini at gera sáttmála um arbeiðstøkuna.

**Fíggjarnevndin 25. mai 2023:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt.

# 127/23 Árligt viðlíkahald á kommunalu brennistøðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 11.01.2022 | 6/22 | 22/00107-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.10.2022 | 42/22 | 22/00107-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 11.04.2023 | 19/23 | 22/00107-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 103/23 | 22/00107-1 |
| 5 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 98/23 | 22/00107-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 127/23 | 22/00107-1 |

**Upprunin til málið**
Í okt. 2020 vísti ein kanning (sí undir skjøl) av Kommunalu brennistøðini á átroðkandi ábøtur. Ein dagførd kanning millum jóla 2021 vísti, at síðuveggirnir í brenniovninum, sum eisini eru køliflatur, eru í verri standi enn væntað, sum undirstrikar tørvin á einum størri viðlíkahaldi, ið er nakað meiri víðfevnt enn vanliga árliga umvælingin. Múrverkið varð neyðturviliga umvælt, so tað vónandi heldur til ætlaða árliga viðlíkahaldið, sum eftir ætlan verður beint eftir páskir, um tað eydnast at fáa eykalutirnar til tíðina.

**Lýsing av málinum**
Fyri ikki at støðga upp í úrtíð, tørvar Kommunalu Brennistøðini eitt meiri víðfevnt viðlíkahald og útskifting enn vanlig ár. Serliga er talan um størri umvæling av ovninum og útskifting av kølaranum. Brennistøðin skal so at siga til klassingar.

Endamálið við hesum er fleirtáttað:
- at gjøgnumganga ovn, pumpur o.a. fyri tørv á øðrum umgangandi og framtíðar viðlíkahaldi og útskifting,
- at fyribyrgja havarí, sum kunnu elva til støðgir í upp í fleiri mánaðir,
- at tryggja, at støðin heldur umhvørviskrøvini til útlát, og at hon so at siga ikki fær “siglingarbann” (sí næsta punkt),
- at skifta ótættar síðuveggir, so tað slepst frá ótilætlaðari luft til brenningina, ið elvir til lægri hita, minni effektiva brenning, lægri “framleiðslu”, og at umhvørviskrøvini til roykútlát ikki kunnu haldast,
- at umvæla annað, sum elvir til ótilætlaðar støðgir, óneyðuga dálking og lægri virknað,
- at leingja livitíðina hjá brennistøðini,
- at fáa mett, hvussu nógv ár støðin kann halda, um øll neyðug viðlíkahald og útskiftingar verða framd rættstundis.

Umframt átrokandi arbeiði á ovnin er eisini neyðugt at skifta summarkølaran til at køla avlopshita burtur, sum Fjarhitafelagið ikki megnar at brúka. Hóast heitið, summarkølari, er hann neyðugur og í nýtslu alt árið. Kølarin má til eina og hvørja tíð vera 100 % virkin. Sleppur brennistøðin ikki av við hitan, støðgar brenningin av ruski. Verandi kølari er tærdur og slitin og vorðin ov vánaligur til at umvæla. Tekniska fyrisiting metir tað vera ov vágið at bíða við at skifta kølaran, til hann gongur fyri. Veitingartíðin uppá nýggjan kølara er í minsta lagi 3 mánaðir, umframt tíð til flutning og uppsetan, tilsamans 4 mánaðir ella meiri.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Talan er um heilt neyðugar umvælingar av brennistøðini fyri, at hon ikki í úrtíð skal koma at liggja lamin í longri tíð í senn. Í hesum sambandi kunnu væntast nakað størri útreiðslur enn í sambandi við árligu umvælingarnar seinnu árini. Tær flestu av hesum útreiðslum vórðu fyrilagdar í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2022.

Fyrisitingin er í holt við at fáa til vega dagførdar kostnaðarmetingar og tilboð upp á neyðug arbeiðir og útgerð, sum verður fyrilagt, tá tølini eru tøk.

Um tað ikki er møguligt at útvega neyðugu eykalutirnar til viðlíkahaldið, sum er ásett til at verða beint eftir páskir, verður stóra viðlíkahaldið útsett til heystið 2022. Ovnurin verður tó kannaður við jøvnum millumbilum fyri at tryggja, at alt koyrir eftir ætlan, til viðlíkahaldið verður gjørt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Boilerworks service - 2020: Tilstandsvurdering

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | X | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | X | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 11. januar 2022:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tað í málslýsingini fráboðaða viðlíkahaldið av Kommunalu brennistøðini verður frá 20. oktober til 16. november 2022. Meðan viðlíkahaldið gongur fyri seg, støðgar brenningin. Væntaði kostnaðurin sambært tilboðum og metingum er um kr. 7,5 mió.

Av tí at støðgurin er so mikið langur, og at IRF bert fær tikið ímóti einum eykabili um samdøgrið, slepst ikki undan at flyta rusk av landinum. Upplýsti kostnaðurin er íroknað skift av kølara og flutningi av burturkasti til brenningar uttanlanda.

Fyri at støðgurin ikki skuldi gerast enn longri, verður ein partur av ætlaða viðlíkahaldsarbeiðinum, og sum kann tola at bíða, framdur í 2023.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. oktober 2022:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**

Sum lýst omanfyri var um ársskiftið 2021/2022 staðfest átroðkandi tørvur á munandi viðlíkahaldi av Kommunalu brennistøðini (KB), sum eisini undirbygt av frágreiðingunum ísv. viðlíkahaldini í 2020 og 2021 (sí *Tilstandsvurdering 2020* og *Inspektionsrapport 2021*). Eisini verður víst til frágreiðing frá SMJ frá desember 2020: *Kanning av ruskøkinum í Tórshavnar kommunu*.

Summarkølarin verður nýttur til at køla tann partin av hitanum burtur, sum Fjarhitafelagið ikki megnar at taka ímóti. Fjarhitafelagið megnar vanliga í miðal bert at taka ímóti um 70% av hitanum frá KB, um veturin nakað meiri, í summhálvuni bert um 50%. Í 2022 tók Fjarhitafelagið í miðal ímóti 69% av hitanum frá KB.

Um summarkølarin á brennistøðini gongur fyri, má brenningin steðga, tí tað gerst torført ella ógjørligt at stýra hitanum í ovninum, sum kann oyðileggjast fullkomiliga, um hitin gerst ov høgur.

At reka eina brennistøð við lekandi ella ongum summarkølara er sum at koyra bil við lekandi kølara ella ongari olju, so brennir motorurin saman. Soleiðis er eisini við ovninum á brennistøðini.

Í nevndu frágreiðingum verður eisini víst á skaðar, ið eru komnir av ov høgum hita og av tørvandi vatni í skipanini, sum sannlíkt stendst av ymsum lekum, ið ikki altíð kunnu staðfestast, fyrr enn skaðin er hendur.

Harumframt var hol á stálsíðunum uttan á ovninum, sum hevði við sær, at ovnurin tók falska luft inn. Hetta gjørdi tað torført ella ógjørligt at stýra hitanum, sum, umframt at elva til brot á umhvørvisgóðkenningina hjá KB, økti vandan fyri fleiri skaðum. Eisini vóru hópin av slitdeilum sera illa farnir, sum aftur gjørdi tað torført m.a. at stýra brenningini og kundi elva til enn fleiri skaðar.

Í desember 2021 vísti leiðslan á brennistøðini á, at summarkølarin var so tardur, at hann ikki kundi umvælast, og at stórir partar av honum longu vóru óvirknir. Ávarað varð tí um vanda fyri ótilætlaðum støðgi í úrtíð. Funnið varð síðani fram til, at veitingartíðin av nýggjum summarkølara var í minsta lagi 3 mánaðir, umframt flutningstíð og uppsetan. Um illa vildi til, og t.d. summarkølarin gekk heilt fyri, og Fjarhitafelagið samstundis ikki kundi taka ímóti øllum hitanum, kundi brennistøðin liggja óvirkin í úr 4 og upp í 6 mánaðir.

Í hesum tíðarskeiði hevði óivað verið møguligt at balla og avskipa burturkastið, lutvíst til IRF, í høvuðsheitum til útlond. Metti kostnaðurin av hesum kundi gerast munandi dýrari enn viðlíkahaldið. Harumframt kundi KB undir slíkum støðgi ikki veita fjarhita, sum hevði ført við sær munandi útreiðslu hjá Fjarhitafelagnum til at brenna olju í staðin.

Eisini vísti leiðslan á KB á, at standurin á brennistøðini hevði við sær, at KB ikki fekk brent líka stórar mongdir, sum, um brennistøðin var viðlíkahildin til fulnar. Trýstið á brennistøðini hevði havt við sær, at brent hevði verið í alt ov nógvar tímar um árið til, at tað var gjørligt at fremja teir tilmældu viðlíkahaldsstøðgirnar.

Fyri at halda seg innan fyri ráðiligan rakstur skal ein og hvør brennistøð í minsta lagi hava ein størri, árligan viðlíkahaldsstøðg, umframt regluligar støðgir við 6-8 viku millumbili fyri at reinsa, fremja eftirlit og bráfeingis viðlíkahald. Fyri at slík arbeiði skulu vera møgulig, er neyðugt at støðga brenniningini og køla skipanina niður, áðrenn fólk sleppur inn í ovnin og til aðrar heitar lutir at arbeiða. Hvør av hesum støðgum tekur tí nakrar dagar, uttan mun til hvussu stórur tørvurin á viðlíkahaldi er.

Samlað merkir tað, at tað við ráðiligum rakstri bert er møguligt (og tilrátt) at brenna um 80% av tíðini, og á einari nýggjari brennistøð við minimalum viðlíkahaldstørvi í mesta lagi 85% av tíðini. Tess eldri ein brennistøð er, tess meiri tíð skal setast av til viðlíkahald. Tess verri standi brennistøðin er í, tess minni megnar hon at brenna.

Fyri at fylgja við økjandi nøgdunum av burturkasti hevur KB seinnu árini brent ímillum 88 og 94 % av tíðini. Tað hevur havt við sær, at tað ikki hevur verið gjørligt at fremja alneyðugar støðgir til at reinsa og fremja eftirlit og bráfeingis viðlíkahald, og tískil at reka brennistøðina á ráðiligan hátt.

**Kostnaður**

Undantikið 2018, tá stjóraskifti var á KB, og einki størri viðlíkahaldsarbeiði var framt, hevur árligi kostnaðurin av viðlíkahaldi á KB seinnu árini í miðal verið kr. 5,6 mió., vaksandi frá kr. 4,7 mió. í 2019, kr. 5,9 mió. í 2020, og kr. 6,3 mió. í 2021.

Bert í heilt serligum føri er peningur játtaðar sum íløgur, og hevur tað veri til størri umvælingar/útskifting.

Seinasta árið er rakstrarjáttanin til KB økt nakað, men tað er fyri at taka hædd fyri øktu útreiðslunum av samstarvinum við IRF um tyrving og viðgerð av rottangaevju á Nýggjheiðum omanfyri Kvívík.

Tá málið um árliga viðlíkahaldið á KB fyri 2022 varð lagt fyri Náttúru- og Umhvørvisnevndina 4. oktober 2022, var metti kostnaðurin av viðlíkahaldinum um kr. 7,5 mió. Men av tí tað ikki var greitt, hvussu nógv av hesum kundi fíggjast yvir raksturin var avgjørt at leggja málið um eykajáttan fyri aftur seinri.

Viðlíkahaldsarbeiðið, sum vanliga hevur verið framt um várið, mátti vegna langa veitingartíð uppá avgerandi lutir, serliga summarkølaran, útsetast til um heystið. Arbeiðið varð útint í oktober-november 2022.

Tá síðurnar á ovninum blivu niðurtiknar, vísti tað seg, at støðan var verri enn mett frammanundan, og gjørdist arbeiðið í sambandi við viðlíkahaldsstøðgin og útflutning av burturkasti heilar kr. 9,7 mió. og sostatt munandi kostnaðarmiklari, enn væntað hevði verið. Budgetterað varð við útflutningi av 800 tonsum, men bleiv veruliga mongdin 1130 tons.

Upplýsingarnar um endaliga kostnaðin av viðlíkahaldsarbeiðinum vóru ikki tøkar fyrr enn eftir ársskiftið.

Afturat høga kostnaðinum av árliga viðlíkahaldinum komu eyka útreiðslur í 2022 fyri um kr. 2 mió., sum koma av at rudda Húsahaga og umvæla gamla maskinu.

Í november 2022 varð ætlan og avtala gjørd um at útflyta jarn í desember 2022. Tá hetta í desember skuldi setast í verk, var maskinan til at avskipa jarn á verkstaði, soleiðis at avskipingin mátti útsetast til byrjanina av 2023. Hetta hevði við sær, at inntøkan av sølu av jarninum á um kr. 4,5 mió. ikki kundi bókførast fyrr enn í 2023.

Samlað førdi hetta við sær eina meirnýtslu á Kommunalu brennistøðini fyri 2022 á kr. 11,7 mió.

Verður inntøkan av teirri í desember 2022 ætlaðu søluni av jarni drigin av meirnýtsluni fyri 2022, er útroknaða meirnýtslan kr. 7,2 mió.

Tekniska fyrisiting hevur gjørt eina ætlan fyri at javna meginpartin av meirnýtsluni í rakstrinum fyri 2023.

Tey mest átroðkandi viðlíkahaldsarbeiðini á brennistøðini blivu framd í 2022. Í mun til miðal útreiðslustøðið fyri árligt viðlíkahald á kr. 5,6 mió. árliga, verður mett, at sparast kunnu kr. 1,5 mió. í viðlíkahaldsútreiðslum í 2023, sum væntandi kunnu haldast á einum støði á um kr. 4,1 mió.

Útroknaði eyka fíggjartørvurin fyri 2023 til at bera upp fyri meirnýtsluna í 2022 gerst sambært hesum sostatt kr. 3,2 mió., sum biðið verður um sum eina eykajáttan.

Lyklatøl:

| Yvirlit | Kostnaður (mio) |
|---|---|
| Meirnýtsla at fíggja í 2022 | -11,7 |
| Søla av jarni í 2023 | 4,5 |
| Mett meir inntøka | 2,5 |
| Mett sparing í viðlíkahaldi | 1,5 |
| Eyka Játtan | -3,2 |

Við eini eyka játtan uppá 3,2 milliónir verður mett, at fíggjarætlanin fyri KB í 2023 kemur at halda.

**Tekniska støðan á KB**
Brennistøðin, sum áðrenn viðlíkahaldsstøðgin var í vanda fyri ótilætlaðum brástøðgi í upp ímóti longri steðgi, er nú so mikið væl viðlíkahildin, at tað aftur er møguligt at stýra hitanum, sum álvarsliga hótti haldbarið av ovninum. Eisini er møguligt at halda umhvørviskrøvini til útlát í roykinum, sum ikki var møguligt áðrenn viðlíkahaldsstøðgin. Dygga viðlíkahaldið hevur eisini í aðrar mátar betrað munandi um vanliga raksturin.

Ein minni partur av neyðuga viðlíkahaldinum kundi og mátti útsetast til 2023. Var tað ikki útsett, hevði viðlíkahaldsstøðgurin blivið uppaftur longri og kostnaðurin av arbeiðinum og av útflutningi av burturkasti somuleiðis uppaftur hægri. Mett verður nú, at írestandi parturin av viðlíkahaldinum tolir at verða útsettur til byrjanina av 2024, soleiðis at rakstrarkostnaðurin fyri 2023 gerst minst møguligur, og kann haldast innan fyri tær nevndu kr. 4,1 mió.

Tá tann seinasti parturin av viðlíkahaldinum er gjørdur, kann brennistøðin tekniskt halda í nøkur ár afturat, treytað av tilmældum støðgum og árligum høvuðsviðlíkahaldi á kr. 5-6 mió.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 7175 | Skiljihøll | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 7110 | | Renovatión | |

| Upphædd |
|---|
| 3.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á brennistøðini mæla til, at játtaðar verða kr. 3,2 mió. av konto 7175 skiljihøll, á konto 7110 rakstur av brennistøðini, til at fíggja ein part av umvælingararbeiðinum, sum var gjørt í 2022 og at beina málið í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 11. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 128/23 Umsókn um at fáa gjørda serliga byggisamtykt fyri økið matr. nr. 1265u og 1265v, oman Viðarlund 1 og 3, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2023 | 68/23 | 23/01717-3 |
| 2 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 128/23 | 23/01717-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.06.2023 | 98/23 | 23/01717-3 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn frá Listasavni Føroya um at gera serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1265u og 1265v, oman Viðarlund, Tórshavn, í sambandi við ynski um at byggja savnið út.

**Lýsing av málinum**
Listasavnið hevur síðani 1970 húsast í bygningum í viðarlundini í Havn og hevur við tíðini bygt og umbygt eftir tørvi. Nú søkir Listasavnið um loyvi at byggja afturat. Ætlanin er at taka bygningin, sum í dag hýsir skiftandi serframsýningum, niður og byggja ein nýggjan á somu grund, umframt ein bygning við verkstovu til børn, og ein bygning til víðkan av verandi listasavni, sí skjal *Projektbeskrivelse.*

Bygglistarliga eru tilvísingar til verandi bygging, men við einum nútímans dámi. Framsíðurnar eru klæddar við trælamellum í ymiskum tjúktum og skapum, og fær bygningurin soleiðis eitt organiskt úttrykk við tilvísingum til umhvørvið og Viðarlundina.

Ognin hjá Listasavninum liggur í einum D1 øki. Vanligt er ikki at loyva bygging í D1 økjum, men Listasavnið hevur ligið sum ein partur av Viðarlundini síðani 70'ini, og tí verður tað mett hóskandi, at tað framvegis ger tað. Byggin er møgulig í D1 økjum, um serstøk byggisamtykt verður gjørd, og tískil verður mælt til at gera serstaka byggisamtykt í tráð við verandi-, og ætlaða bygging.
Listasavn Føroya hevur keypt sethúsini á grannastykkinum, matr. nr. 1265v, Tórshavn, og er ognin partur av virkseminum hjá savninum og nýggju ætlanini. Økið liggur í A1 sethúsaøki, og mælt verður til at broyta byggisamtyktina fyri matrikulin til D1 fríøki, og at serstaka byggisamtyktin somuleiðis fevnir um hendan matrikulin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.
- Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Matr. nr. 1265v, Tórshavn, er partur av sethúsaútstykking oman Viðarlund, og broytingin av almennu byggiamtyktini fyri ognina frá sethúsaøki til fríøki skal sendast grannum til hoyringar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Talan er um skógfriðað øki, og skal byggisamtyktin góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

**Skjøl**
- *Projektbeskrivels.pdf,* journal nr. 23/01717-1.
- *Serstøk byggisamtykt fyri Listasavnið,* journal nr. 23/01717-4.
- *Almenna byggisamtyktin – áðrenn broyting,* journal nr. 23/01717-6.

- *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting,* journal nr. 23/01717-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Listaskálan, og at broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 1265v til D1 øki, treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Tikið av skrá.

# 129/23 Mannagongdir viðvíkjandi koyripengum til býráðs- og nevndarlimir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 85/22 | 22/01007-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 240/22 | 22/01007-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 315/22 | 22/01007-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 132/23 | 22/01007-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 148/23 | 22/01007-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 129/23 | 22/01007-1 |

**Upprunin til málið**
Býráðspolitikarar búsitandi uttanfyri Havnina hava higartil ikki fingið koyripengar í sambandi fundir o.l. Meginreglurnar hava verið grundaðar á tulkingum hjá TAKS, sum ásetur, at bara løntakarar hava rætt til koyripengar frá arbeiðsgevara í sambandi við nýtslu av egnum bili í arbeiðsørindum. Býráðspolitikarar fáa samsýning – og vera ikki tí roknaðir sum løntakarar – m.a. eftir Kunngerð um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini.

**Lýsing av málinum**
Í hesum sambandi er heitt á SPEKT um eina fakliga meting av hesum spurningi, og hava tey spurt TAKS, um býráðslimir hava rætt til koyripengar eftir §29, stk. 7, í skattalógini í sambandi við arbeiðið sum býráðslimum og nevndarlimur í kommunalum nevndum.

TAKS svarar í telduposti 12.05.2021, at tey vísandi til rundskriv nr. 1/1997 um skattliga viðgerð av endurgjøldum fyri ferðaútreiðslur v.m. hjá nevndarlimum o.ø. hava endurmett sína støðu, at tey nú meta, at endurgjald kann veitast í hesum førum. Í rundskrivinum verður tó ikki nágreinað, hvørjar ferðaútreiðslur eru fevndar av rundskrivinum.

Í útgreinandi svari frá TAKS dagf. 26.01.2022 upplýsa tey, at tey *"hava umrøtt hetta internt og halda at ásetingarnar í rundskrivinum kunnu brúkast til býráðslimir. Vit meta tó, at hetta skal avmarkast til regluligar fundir í býráðnum og regluligar fundir í teimum nevndum har býráðslimurin er partur av. Vit meta hinvegin ikki, at ásetingin kann brúkast til alt virksemi sum er tengt at, at verða limir í einum býráði."*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 86 frá 1. sept. 1993 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við Ll nr. 173 frá 21. des. 2021.
Kunngerð um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini (K.nr. 93 frá 9. sept. 2014).
TAKS: Rundskriv nr. 1/1997 Um skattliga viðgerð av endurgjøldum fyri ferðaútreiðslum v.m. hjá nevndarlimum o.ø.
Mannagongd: "Koyripengar til býráðs- og nevndarlimir"; TK-Starvsfólkadeildin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Sak: 21/02495: Endurgjald fyri ferðaútreiðslur til býráðs- og nevndarlimir.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
Dagførd mannagongd at leggja í politikarahondbókini: "Koyripengar til býráðs- og nevndarlimir", dagf. 09.03.20222.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávísøkir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla fíggjarnevndini til at dagføra mannagongdina fyri koyripening. Sí skjal Koyripengar til býráðs- og nevndarlimir.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Í svarinum frá TAKS 12.05.2021 upp á fyrispurning, um býráðslimir hava rætt til koyripengar, vísa tey til rundskrivi nr. 1/1997 um skattliga viðgerð av endurgjøldum fyri ferðaútreiðslur v.m. hjá nevndarlimum o.ø., at endurgjald ***kann*** veitast. Og eftir nýggja umrøðu av málinum internt nevna tey í útgreinandi svarinum d. 26.01.2022, at ásetingarnar í ***kunnu*** brúkast til býráðslimir, men at hetta skal avmarkast til regluligar fundir í býráðnum og regluligar fundir í teimum nevndum har býráðslimurin er partur av.

Høvuðsreglan er nú sum fyrr, at tað bert eru løntakarar, ið hava rætt til koyripengar frá arbeiðsgevara. Býráðspolitikarar verða ikki roknaðir sum løntakarar, tí teir fáa samsýning eftir Kunngerð um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini.

Sostatt er rundskriv nr. 1/1997 um skattliga viðgerð av endurgjøldum fyri ferðaútreiðslur v.m. hjá nevndarlimum o.ø. ikki viðkomandi, um kommunan ikki sjálv avgerð, at ásetingarnar í rundskrivinum **skulu** galda fyri býráðslimirnar hjá kommununi.

Niðurstøðan er sostatt, at býráðslimir bert hava rætt til koyripengar, um býráðið ynskir tað og samtykkir hetta.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla fíggjarnevndini til at umrøða málið.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Málið umrøtt.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Samtykt at beina málið í býráðið til støðutakan.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Tikið av skrá.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mai 2023 | Blað nr.: 517 |
| | Formansins merki: |

## 130/23 Framflytingar fyri roknskaparárið 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 127/23 | 23/01899-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 115/23 | 23/01899-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 130/23 | 23/01899-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært játtanarreglunum hjá Tórshavnar kommunu verða meir- og minninýtslur fluttar fram til komandi ár. Framflytingar skulu játtat sum eykajáttan í býráðnum, tvs. skulu hava tvær viðgerðir.

Meirnýtsla, sum í mesta lagi kann vera 5% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Meirnýtsla skal vera burtur innan trý ár.

Minninýtsla, sum í mesta lagi kann vera 10% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski er at flyta meira enn 10% til árið eftir, kann ein umbøn um hetta sendast avvarðandi fyrisitingarstjóra.

**Lýsing av málinum**
Ársroknskapurin fyri 2022 er gjørdur upp, og gjørt er eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2022.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn er fyri rakstur 20,4 mió. kr. netto og fyri íløgur 200,5 mió. kr og er útgreinað soleiðis:

| | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| TK | 5,6 mió | 133,4 mió |
| TH | 14,8 mió | 67,1 mió |
| **Ialt** | **20,4 mió** | **200,5 mió** |

Samlaða minninýtslan á rakstrarsíðuni fyri Tórshavnar kommunu frároknað Tórshavnar havn er 5,6 mió. kr. Á § 1,2.3,5 er talan um minninýtslu, imeðan tað á § 4,6 og 7 er talan um meirnýtslu.

Víst verður til uppskot til broytingar í framflytingum í skjali 23/01899-4

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. mai 2023 | Blað nr.: 518<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| Ymiskar | | Framflutt 2022 |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| Ymiskar | | Játtan 2023 | |

| **Upphædd** |
|---|
| 220,9 mió |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Stjórnin og virkandi fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting á 20,4 mió. kr. netto til rakstur og 200,5 mió. kr. til íløgur. Eisini verður mælt til at gera broytingar í framflytingini sambært viðlagda skjali nr. 23/01889-4

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

| | Býráðsfundur<br>25. mai 2023 | Blað nr.: 519<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 131/23 Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 153/23 | 23/02110-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 131/23 | 23/02110-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunustýrislógin inniheldur ásetingar um grannskoðan av kommununum.

**Lýsing av málinum**
-
**Lógir, ásetingar o.a.**
Kommunustýrislógin:
Sambært §§ 45-47 er tað eitt krav, at kommunur hava óhefta og sakkøna grannskoðan, ið er ríkisgóðkend ella skrásett.
Sambært § 38, stk 3, nr 4 hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini [grannskoðaraprotokollin, red] fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- Grannskoðaraprotokoll fyri ársroknskapin 2022
- Àrsroknskapur 2022

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir býráðnum umvegis fíggjarnevndina til at góðkenna grannskoðaða ársroknskapin fyri 2022.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Góðkent og at beina málið í býráðið.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt.

| Býráðsfundur<br>25. mai 2023 | Blað nr.: 521 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

## 132/23 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 64/23 | 23/00151-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 55/23 | 23/00151-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 91/23 | 23/00151-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.03.2023 | 97/23 | 23/00151-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 85/23 | 23/00151-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 129/23 | 23/00151-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 116/23 | 23/00151-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 154/23 | 23/00151-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 132/23 | 23/00151-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Framlagt og góðkent.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 18:00</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Jákup Dam | Gunvør Balle |
| Annika Olsen | Birgir Nielsen | Súsanna Olsen |
| | Jón Kragesteen | |